| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. oktober 2022 | Blað nr.: 874 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 27. oktober 2022 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 226/22 – 251/22**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Ruth Vang
Bergur Robert Dam Jensen
Odd Færø

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Eyðfríð Jacobsen
Bogi Jacobsen
Eyðna Justinussen
Barbara Vang

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. oktober 2022 | Blað nr.: 875<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 226/22 | 22/05720-1 | Tróndur Sigurðsson berst frá at møta á býráðsfundi 27. oktober 2022 | 877 |
| 227/22 | 22/05760-1 | Kári Johansen berst frá at møta á býráðsfundi 27. oktober 2022 | 878 |
| 228/22 | 22/00011-1 | Mál beind í nevndir 2022 | 879 |
| 229/22 | 22/04672-1 | Fíggjarstøða Musikkskúlin | 881 |
| 230/22 | 22/04673-1 | Fíggjarstøða Ítróttaanlegg | 884 |
| 231/22 | 22/04552-2 | Umsókn um forskúlalíknandi tilboð í Velbastaðar skúla | 887 |
| 232/22 | 21/01264-3 | Eysturskúlin : Fyrispurningur um bátakeyp - 'M/B Spógvin' | 890 |
| 233/22 | 21/03792-3 | Tórshavnar kvøldskúli : Samstarv við Sørvágs og Vága kommunur um undirvísing - føroyskt sum annaðmál | 894 |
| 234/22 | 21/02924-1 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrium | 897 |
| 235/22 | 22/00894-1 | Hølisloysn til nýggja hádeild í Sankta Frans skúla | 901 |
| 236/22 | 22/03166-5 | Fríksúlin í Havn: Umsókn at stovna forskúla | 913 |
| 237/22 | 22/04616-1 | Fíggjarstøðan hjá Skúlanum á Fløtum | 917 |
| 238/22 | 14/00762-44 | Keyp av lendi á Argjum, matr.nr 122h | 919 |
| 239/22 | 22/03152-3 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri Viðarlundina á Argjum, matr. nr. 4a | 921 |
| 240/22 | 22/02144-1 | Skeltisreglugerð | 923 |
| 241/22 | 22/03571-1 | Miðbýarkjarnan | 930 |
| 242/22 | 21/01164-1 | Fígging til smærri verkætlanir | 934 |
| 243/22 | 22/04630-1 | Eykajáttan til nýggja maskinu til vegamerking | 937 |
| 244/22 | 21/02196-2 | Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK | 940 |
| 245/22 | 19/00853-1 | Dagføring av Jøkulstræti | 946 |
| 246/22 | 22/01107-2 | Dagføring av rottangum á matr. nr. 1au, Hoyvík | 950 |
| 247/22 | 22/04229-3 | Áheitan um fund um parkeringsviðurskiftini við Nazaret í Kaldbak | 952 |
| 248/22 | 22/04583-1 | Skjótløðistøð til kommunal akfør | 954 |
| 249/22 | 22/04851-1 | Fíggjarætlan 2023, Tórshavnar kommuna | 956 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 250/22 | 22/00009-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022 | 963 |
| 251/22 | 18/04076-1 | Møgulig standmynd/minnismerki um Andreu Árting | 966 |

**Til viðgerðar**

## 226/22 Tróndur Sigurðsson berst frá at møta á býráðsfundi 27. oktober 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 226/22 | 22/05720-1 |

**Málslýsing**
Tróndur Sigurðsson hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Bergur R. Dam Jensen, eru loknar.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 227/22 Kári Johansen berst frá at møta á býráðsfundi 27. oktober 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 227/22 | 22/05760-1 |

**Málslýsing**
Kári Johansen hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Odd Færø, eru loknar.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 228/22 Mál beind í nevndir 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 3/22 | 22/00011-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 25/22 | 22/00011-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 55/22 | 22/00011-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 82/22 | 22/00011-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 108/22 | 22/00011-1 |
| 6 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 134/22 | 22/00011-1 |
| 7 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 178/22 | 22/00011-1 |
| 8 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 194/22 | 22/00011-1 |
| 9 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 228/22 | 22/00011-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. oktober 2022 | Blað nr.: 880 |
| | | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Tikið til eftirtektar**.**

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Tikið til eftirtektar.

## 229/22 Fíggjarstøða Musikkskúlin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 14.09.2022 | 188/22 | 22/04672-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 219/22 | 22/04672-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 201/22 | 22/04672-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 229/22 | 22/04672-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarstøðan.

**Lýsing av málinum**
Rakstrarárið 2021 hevði Musikkskúlin eina samlaða meirnýtslu uppá tkr. 2.548, svarandi til 29%. Av hesum vóru tkr. 633 meirnýtsla frá 2019, ið eisini var fyrsta fulla rakstrarárið í nýggja musikkskúlabygninginum.

Tað er í st.kt. viðlíkahald v.m., at nógv størri nýtsla er enn játtað – tilsamans tkr. 1.325, sí meira niðanfyri.

St.kt. 73 flyting til landið, tað er kommununnar partur av musikkskúlalæraralønum, hevur eisini stóra meirnýtslu uppá tkr. 516. Tað merkir, at Musikkskúlaskipanin (landið) hevur latið Musikkskúlanum fleiri undirvístingartímar enn kommunan hevur játtað i fíggjarætlanini. Sama støða var í 2020, har munurin er tkr. 377. Hesi bæði ár hevur skúlin sostatt eina meirnýtslu uppá tkr. 893, tí fíggjarætlanin hevur verið ov lágt sett hesum viðvíkjandi. Játtanin hjá Musikkskúlaskipanini er ikki kend fyrr enn beint undan jólum, tá fíggjarløgtingslógin er samtykt, og tá hendir, at játtanin er broytt í mun til tað, sum kommunan hevur samtykt í november.

Økta virksemið sæst eisini aftur í, at inntøkurnar í 2021 eru tkr. 193 hægri enn fíggjarætlanin legði upp til.

Viðv. stóru útreiðslunum í viðlíkahald, tvs. í nýggja bygningin, so hevur metingin hjá skúlans leiðslu verið, at nógvir átrokandi manglar máttu gerast, skuldi skúlin virka, men sum játtan tó ikki var til. Nevnast kann fuktarar, sum tryggja at ljóðførini ikki oyðileggjast eins neyðuga luftvætu fyri tey fólk, sum inni eru, hetta vegna feil í ventilatiónsskipanini. Fleiri ljóð- og ljósskipanir máttu umvælast, og enn er Hátún ikki á tí tøkniliga støði, sum ynskiligt var. Stikkkontakir manglaðu nógvastaðni, og fyri at fáa undirvísingina at bera til, hevur skúlin verður noyddur at seta í verk eyka el-arbeiði. Elektronisku lásini er eisini bøtt uppá. Korona hevði eisini ávirkan á útreiðslurnar osfr.

Fyri brúkið í bygninginum hevur verið avbjóðandi, at bygningurin vísti seg at hava nógvar manglar og lýti, harav partar enn eru í einum tryggingarósemju við ráðgevan, og sum eisini er tyngjandi fyri dagliga virksemið.

Framroknað er væntandi, at raksturin í 2022 hvílur nøkulunda í sær sjálvum, tó burtursæð frá framfluttu meirnýtsluni. Um inntøkurnar halda og flyting til landið er sbrt fíggjarætlanini, kann roknast við, at meirnýtslan við ársenda 2022 er lækkað niður á tkr. 2.180. Tað er tí ikki sannlíkt, at rakstrarstaðið kann arbeiða hesa upphædd niður komandi 3 árini uttan at skerja virksemið.

Um eykajáttan verður latin til tær tkr. 893, sum er ósamsvarið millum játtanina hjá kommununi og staðfestu musikksskúlalønirnar til landið, verður meirnýtslan uml. tkr. 1.287. Eisini henda upphæddin er avbjóðandi hjá musikkskúlanum at fáa burtur eftir trimum árum, sum ásett í játtanarreglunum, uttan at tað gongur út yvir virksemið.

Til tess at fíggja hetta verður mett, at til ber at at játta tkr. 1.500 av kontu 5510 Tórshavnar býarsavn, sum hevur minninýtslu í 2022, og tkr. 700 av løgukontu 5275 Tórshavnar kvøldskúli løgukarmur LK52002 Kvøldskúlin, tvs. tilsamans tkr. 2.200.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Játtanarereglur.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5510<br>5275 | | Býarsavnið kr. 1.500.000<br>Kvøldskúlin kr. 700.000 | 5110 | | Musikkskúlin | | 2.200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at flyta tkr. 1.500 av kontu 5510 Tórshavnar býarsavn og tkr. 700 av løgukontu 5275 Tórshavnar kvøldskúli løgukarmur LK52002 Kvøldskúlin, tvs. tilsamans tkr. 2.200, til kontu 5110 Musikkskúlin sum eykajáttan.

**Mentamálanevndin 14. september 2022:** Ein meiriluti: Annfinn Brekkstein, Súna Mørk, Kristianna W. Poulsen taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

Annika Olsen og Ruth Vang atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Samtykt við sjey atkvøðum fyri, tveimum ímóti og fýra blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg og Gunvør Balle

Blankt atkvøddu: Jákup Dam, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Samtykt við aðru viðgerð við sjey atkvøðum fyri, seks blonkum atkvøðum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Odd Færø, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

# 230/22 Fíggjarstøða Ítróttaanlegg

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 14.09.2022 | 189/22 | 22/04673-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 05.10.2022 | 203/22 | 22/04673-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 246/22 | 22/04673-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 230/22 | 22/04673-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarstøðan.

**Lýsing av málinum**
Rakstrarárið 2021 hevði Ítróttaanlegg eina samlaða meirnýtslu uppá tkr. 1.955, svarandi til 13%. Meginorsøk til stóra ósamsvarið er at finna í inntøkunum, sum vóru tkr. 1.105 ell 36% lægri enn fíggjarætlanin. Nógv tiltøk vóru avlýst vegna koronu, sum hevur ávirkað inntøkurnar. Í lønarjáttanini er eisini meirnýtsla uppá 27%.

Gongdin higartil í 2022 sær heldur frægari út serliga viðvíkjandi inntøkum, sum væntast at vera uml. tkr. 500 hægri enn í fjør. Framvegis er tó meirnýtsla í lønum og rakstri.

Nýggj leiðsla tekur við 1. oktober 2022.

Fíggjarstøðan verður munandi betrað, um rakstrarstaðið fær eykajáttan eitt nú svarandi til inntøkumissin í 2021, sum korona voldi, og har fíggjarstøðuna annars verður at fáa á beint frameftir. Mett verður tó, at best hevði verið at fingið alla meirnýtsluna burtur, so at ein meira haldfør fíggjarætlan liggur til grund fyri planleggingini av virkseminum komandi árini bæði hvat rakstri og skipan viðvíkur.

Á grein 5 løgukontu 5775 Ítróttaanlegg eru fleiri játtanir, sum ikki eru komnar í gongd og væntast heldur ikki at koma í gongd í 2022, og sum kundu fíggjað meirnýtsluna hjá stovninum. Sum uppskot kundi tað verið løgukarmur LK57042 Frælsur ítróttur tkr. 1.000, LK57041 Innandura spælipláss tkr. 1.000, ella LK57016 Golfvøllur.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Játtanarreglur.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| Býráðsfundur<br>27. oktober 2022 | Blað nr.: 885<br><br>Formansins merki: |
|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | LK57041 og LK57042 | Innandura spælipláss kr. 1.000.000 Frælsur ítróttur kr. 1.000.000 | 5717 | | Ítrottaanlegg | | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at flyta av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg tkr. 1.000 av løgukarmi LK57042 Frælsur ítróttur og tkr. 1.000 av løgukarmi LK57041 Innandura spælipláss, tvs. tilsamans tkr. 2.000, til kontu 5717 Ítróttaanlegg sum eykajáttan.

**Mentamálanevndin 14. september 2022:** Útsett

**Ískoyti:**
Skotið verður upp, at eykajáttanartørvurin hjá stovninum Ítróttaanlegg tkr. 2.000 verður fíggjaður av løgukarmi 5775 Ítróttaanlegg LK57016 Golfvøllur á Glyvursnesi. Mett verður, at hetta ávirkar ikki ætlaðu arbeiðini viðvíkjandi golfvøllinum í 2023.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at flyta tkr. 2.000 av løgukarmi 5775 Ítróttaanlegg LK57016 Golfvøllur til kontu 5717 Ítróttaanlegg sum eykajáttan.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ruth Vang var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmæl samtykt.

# 231/22 Umsókn um forskúlalíknandi tilboð í Velbastaðar skúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 20.09.2022 | 55/22 | 22/04552-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 05.10.2022 | 201/22 | 22/04552-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 251/22 | 22/04552-2 |
| 4 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 231/22 | 22/04552-2 |

**Upprunin til málið**
Fyrstilærarin í Velbastaðar skúla søkir í teldubrævi til Tórshavnar kommunu dagfest 29. August 2022 um fígging til forskúlalíknandi tilboð í Velbastaðar skúla

**Lýsing av málinum**
Frá skúlaárinum 2023/24 er ynski at skipa forskúlalíknandi tilboð í Velbastaðar skúla. skúlin søkir um forskúlalíknandiboð í samstarvi við Dagstovnin á Velbastað.

Í umsóknini stendur, at ætlanin er at skúlin skipar í samstaravi við dagstovnin eitt forskúlalíknandi tilboð, har taln verður um at hava eina forvitnisliga og spælandi tilgongd til tøl, mongdir, bókstavir og ljóð.

Skúlin søkir um játtan til 12,5 tímar, so børnini kunnu møta ein hálvan tíma áðrenn tilboðið byrjar, sum so er 10 tímar um vikuna. Børnini fara so í dagstovnin tá tey eru liðug í forskúlalíknandi tilboðnum.

Í umsókníni stendur m.a.:" At skipa hetta samstarv hevur nógvar fyrimunir fyri dagstovn, skúla, børn, námsfrøðingar og lærarar. Samstarvið verður styrkt millum skúla og stovn. Starvsfólkini koma at kenna hvørt annað, og hetta verður mett at vera ein fyrimunur í sambandi við skúlafyrireiking av nýggjum næmingum. Frítíðarskúlasamstarvið verður eisini styrkt av hesum."

Endamálið við forskúlalíknandi tilboðnum er, at børnini læra skúla og starvsfólk at kenna og at gera skifti millum dagstovn og skúla lættari. Tímarnir í foskúlalíknandi tilboðnum verða lagdir til rættis í samstarvi millum dagstovn, skúla og foreldur. Forskúlalíknandi tilboðið verður eisini partur av innskúlingini, yngsta bólki í skúlanum.

Væntandi verða 6 børn í tilboðnum.

Sambært § 6 í kunngerðini um skipan og læring í forskúla, kunngerð nr. 108 frá 8. august 2013, kann forskúlaflokkur verða stovnaður, tá 12 børn eru í flokkinum, tó kann undantak gerast í smærru skúlunum.

Sambært fólkaskúlalógini § 4 stk. 4 kann verða loyvt at seta 1 árs forskúlaflokk/ar á stovn eftir gjøllari reglum, sum landsstýrismaðurin setur. Í § 30 stk. 3 stendur, at undirvísingin í ávikavist forskúlaflokki, 1. og 2. skúlaári ella 1., 2. og 3. skúlaári kann lutvís verða samskipað. Á hesum somu floksstigum kann øll undirvísingin í teimum smáu skúlunum verða samskipað.

Útreiðslurnar til forskúlalíknandi tilboð eru læraraløn og rakstrarjáttan pr. næming. Foreldrini rinda foreldragjald, men gjaldið er til dagstovnin, og skúlin hevur ikki inntøkur av foreldragjaldi.

Í uppskotinum til FÆ2023 er játtan sett av til 10 tímar um vikuna til forskúlalíknandi tilboð á Velbastað. Talan er um 5 mánaðir í av skúlaárinum 2023/24, tvs. august – desember. Um samtykt verður at játta 12,5 tímar, so má játtanin hækka samsvarandi.

Víst verður eisini til býráðssamtykt tann 24. februar 2022, at forskúlar verða skipaðir í øllum kommunalu skúlunum

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019

Kunngerð nr. 108 frá 8. august 2013 um skipan og læring í forskúla

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Einki at viðmerkja

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla Trivnaðarnevndini at játta umsóknini og søkja Uttanríkis- og mentamálaráðið um loyvi at seta á stovn forskúlalíknandi tilboð í Velbastaðar skúla frá skúlaárinum 2023/24.

**Trivnaðarnevndin 20. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Forskúlalíknandi tilboð og forskúlar annars hava við sær broytingar á dagstovnaøkinum, serliga viðv. 6 ára tilboðum og frítíðarskúla til forskúla, og sum mentamálanevndin vanliga hevur tikið til eftirtektar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla mentamálanevndini at taka undir við samtyktini hjá trivnaðarnevdini 20. september 2022.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ruth Vang var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

# 232/22 Eysturskúlin : Fyrispurningur um bátakeyp - 'M/B Spógvin'

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 10.06.2021 | 41/21 | 21/01264-3 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 15.11.2021 | 75/21 | 21/01264-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 323/21 | 21/01264-3 |
| 4 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 10/22 | 21/01264-3 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 10.03.2022 | 18/22 | 21/01264-3 |
| 6 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 74/22 | 21/01264-3 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 250/22 | 21/01264-3 |
| 8 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 232/22 | 21/01264-3 |

**Upprunin til málið**
Vantandi atgongd til bát hjá sjóvinnubreytini í Nám X

**Lýsing av málinum**
Eysturskúlin hevur í skrivið til Tórshavnar kommunu greitt frá tørvinum á báti til sjóvinnubreytina í Nám X.

Skúlaárið 2021/22 verða 27 næmingar á sjóvinnubreytini, og tað eru fleiri enn undanfarnu árini.

Eysturskúlin hevur ein bát, Álafoss, sum varð keyptur til breytina í 2016. Breytin hevur haraftrat havt atgongd til bátin hjá einum av lærarunum á sjóvinnubreytini, men hesin fer frá nú, og støðan er tí tann, at tað verður ein avbjóðing at sleppa á flot við næmingunum. Við Álafossi sleppa í mesta lagi 6-7 hvørja ferð og sama tal við hinum bátinum, ið breytin hevur havt atgongd til, so upp til 14 næmingar eru slopnir við hvørja ferð.

Í skrivinum frá Eysturskúlanum stendur m.a.:" Sjóvinnubreytin hevur 10 tímar um vikuna. 4 tímar eru til navigatión, har næmingarnir enda við próvtøku í dugnaskapsroyndini til stuttleikabátar upp til 20 tons, eru á trygdarskeiði og fáa prógv til skjóttgangandi bátar. Í samstarvi við Vinnuháskúlan undirvísa lærarar haðani umrøddu 4t/v. Undirvísingin er fríggjadagar alt árið.

Týsdagar eru 6 tímar til verkliga partin, har endamálið er at geva næmingunum innlit í sjólívið og royndir at virka á sjónum.
Farið verður á flot tá tað viðrar. Trygdin er avgerandi. Tað krevur góðan og tryggan bát/bátar, har øll trygdarútgerð er tøk saman við flot/bjargingarbúnum til allar næmingarnar.
Næmingarnir læra at hagreiða fisk og fugl, royna við snøri, snellu, línu osfr. Í ástøði verða næmingarnir lærdir handverkið sum krevst fyri at kunna fáa frá hondini tað, sum krevst í sambandi við sjólívið - m.a. gera til fiskireiðskap, spleysa, knýta, bøta trol osfr. Eisini vitja næmingarnir virkir, sum hava við fiskivinnuna at gera."

Skúlin hevur fingið tilboð frá nýggju eigarunum av Spógvanum um, at teir kunnu bjóða skúlanum bátin til breytina, tá tørvur er at fara á flot. Treytin er, at teir hava tveir menn við umborð. Kostnaðin kennir skúlin ikki.

Bert við einum báti verður sera torført hjá skúlanum at fáa verkliga partin á sjónum at bera til, og hesin parturin hevur stóran týdning fyri sjóvinnubreytina.

Um skúlin skal keypa ein bát aftrat verður neyðugt at seta játtan av til tað í fíggjarætlanini fyri 2022. Skúlin hevur spurt aðrar skúla um teir eru áhugaðir at samstarva um ein bát og tveir teirra hava svarað, at tað eru teir.

Í 2016 fekk Eysturskúlin eina eykajáttan á kr. 200.000 til at keypa og dagføra ein bát.

Kannað eigur, um til ber at gera avtalu um leigu av hóskandi báti, sum skúlin ella skúlar í felag kunnu ráða yvir alt skúlaárið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki av viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Einki at viðmerkja

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at taka støðu til, um arbeiðast skal víðari við málinum.

**Trivnaðarnevndin 10. juni 2021:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Síðani viðgerðina seinast hevur Nám X/Eysturskúlin og umsitingin verið í samskifti við Sjóvinnustýrið viðv. standinum á verandi fari – M/B Álafossi.

Tað vísir seg, at gáað hevur ikki verið eftir, at nýggj kunngerð er komin innan økið t.e. kunngerð nr. 104 frá 9. juli 2019 um at sigla við førum, ið taka upp í 12 ferðafólk, ið eisini fevnir um før, ið vera nýtt til yrkisupplæring í sigling – sum Nám X sjóvinnubreyt má metast at vera.

Sí kunngerðina her: [https://www.logir.fo/Kunngerd/104-fra-09-07-2019-um-at-sigla-vid-forum-id-taka-upp-i-12-ferdafolk](https://www.logir.fo/Kunngerd/104-fra-09-07-2019-um-at-sigla-vid-forum-id-taka-upp-i-12-ferdafolk)

Talan er um umfatandi regluverk og í stuttum kann sigast at verandi bátur skal umvælingar og umbyggjast fyri kanska eini 600-700 tkr. (sbrt. tilboð) um hann skal vera góðkendur framyvir. Sum heilt verður mett, at tað ikki er ráðiligt at brúka hesa upphædd uppá eitt far, ið er nærum 50 ára gamalt.

Sostatt er støðan at tað verandi farið helst ikki er egnað, umframt at tað var ynskiligt við einum fari afturat. Skal eitt far útvegast, ið lýkur treytirnar í kunngerðini er helst talan um eina útveganarupphædd á millum 450-500 tkr. fyri eitt brúkt far og um eitt nýggjari far so 1.000 – 1.500 tkr.

Vegna støðuna hevur Nám X ikki brúkt Álafoss her í heyst, men hevur gjørt avtalur við eina røð av vinnufeløgum v.m. soleiðis at næmingarnir hava kunna verið á sjónum og við tyrlu. Leiðslan í Nám X metir tó at tað hevði verið ynskiligt at havt eitt far, ið kann brúkast til at royna sigling og ymiskan reiðskap í fjørinum og eystanfyri. Roynt hevur verið at fingið avtalur við eigara av onkrum minni fari, men vísir tað seg ikki at vera so líkatil, bæði í mun til nýggju krøvini og kostnaðin.

Á fundin kemur ábyrgdarhavandi lærari fyri sjóvinnubreytina og leiðsluna á Nám X at greiða frá innihaldinum í breytini, tørvinum og møguligum loysnum.

Eitt ítøkiligt boð er uppá ein bát til umleið 450 tkr. Hugsanin er at fíggja umleið 1/3 við at selja M/B Álafoss (íroknað fiskiloyvi í bólki 5B) og síðani at restin verður fíggjað í 2022 av kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum og kontu 4118 Eysturskúlin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at heimila umsitingini at fara undir útvegan og keyp av brúktum báti til upp til 500 tkr., umframt at heimila umsitingini at selja M/B Álafoss íroknað fiskiloyvi og at fíggja keypið við sølu av bátinum, umframt av kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum og kontu 4118 Eysturskúlin. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 15. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Málið útsett.

**Ískoyti**:
Málið er ikki komið fyri í fíggjarnevndini. Mælt verður til at taka støðu til um málið skal viðgerast av nýggjum ella sendast aftur til fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 10. mars 2022:** Samtykt at halda fast í tilmælinum 15. november 2021 at selja M/B Álafoss og at beina málið aftur í fíggjarnevndina

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at loyva at M/B Álafoss verður seldur.

**Ískoyti:**
Bátasølan hevur móttikið eitt boð uppá 100 tkr. TK skal gera nakrar umvælingar, mettar at kosta umleið 11tkr. Kommunan fær sostatt 89tkr fyri M/B Álafoss, treytað av, at Fíggjarnevndin tekur undir við at selja M/B Álafoss.

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin og trivnaðarstjórin mæla til at umvæla og selja bátin, treytað av, at Fíggjarnevndin tekur undir við at selja m/B Álafoss.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** samtykt at selja M/B Álafoss og ikki gera nakra umvæling innan søluna.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

# 233/22 Tórshavnar kvøldskúli : Samstarv við Sørvágs og Vága kommunur um undirvísing - føroyskt sum annaðmál

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.10.2021 | 231/21 | 21/03792-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 248/21 | 21/03792-3 |
| 3 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 250/21 | 21/03792-3 |
| 4 Mentamálanevndin | 05.10.2022 | 200/22 | 21/03792-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 247/22 | 21/03792-3 |
| 6 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 233/22 | 21/03792-3 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kvøldskúli og Uttanríkis- og mentamálaráðið (UMMR)

**Lýsing av málinum**
Í mong ár hevur Tórshavnar kvøldskúli bjóðað málundirvísing fyri tilflytarum v.m. í føroyskum. Hetta virksemi hevur verið í vøkstri farnu árini og hevur fingið alsamt størri týdning nú vaksandi tal av útlendingum flyta til landið. Í fjør bleiv undirvísingin skipað formliga av nýggjum sbrt. sonevndu CEFR-skipanini (evropeisk útbúgvingarskipan), ið tryggjar at næmingurin kann fáa eitt formligt prógv, ið kann brúkast í framhaldandi lestri v.m. Talan er um undirvísing nevnd ‘Føroysk sum annaðmál 1, 2 og 3’ og tekur tað vanliga hálvtannað ár at koma ígjøgnum og krevur tað, sum svarar til umleið ½ tíð tað tíðarskeiðið skeiðini eru.

Ikki øll øki kring landið hava eins góðar fyritreytir fyri at skipa hesa undirvísing, og er tí ynski frá UMMR og Sørvágs- og Vága kommunum, at Tórshavnar kvøldskúli kann skipa fyri skeiðum í Vágum hetta komandi skúlaárið. Tímajáttanin verður endurgoldin frá UMMR, meðan ávísur kostnaður er av næmingarumsitingin v.m. Hugsanin er at Sørvágs- og Vága kommunur rinda eitt ómaksgjald til Tórshavnar kvøldskúla fyri tænastuna. Hugsanin er at royna hesa skipan í eitt ár fyri fyrst og so meta um møguligt víðari samstarv.

Slíkt samstarv er heimilað í lógini um frítíðarundirvísing.

Gjørt er uppskot til samstarvsavtalu millum Tórshavnar kommunu og Sørvágskommunu og Vága kommunu. Sí hjálagt skjal.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at innganga samstarvsavtalu við Sørvágs kommunu og Vága kommunu um undirvísing í 'føroyskum sum annaðmál' í Vágum skúlaárið 2021/22. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sáttmálin fór úr gildi 30. juni 2022. Tórshavnar kvøldskúli, Sørvágs kommuna og Vága kommuna eru sinnað at inngang nýggja samstarvsavtalu, hesaferð við gildiskomu í trý ár. Kommunurnar meta ikki, at tørvur er á eini eftirmeting, sum sáttmálin annars ásetur. Samstarvsavtalan kann uppsigast við seks mánaðar freist. Ongar grundleggjandi broytingar eru í avtaluni, talan er tí um at leingja verandi samstarvið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini at inngang samstarvsavtalu við Sørvágs kommunu og Vága kommunu um undirvísing í `"føroyskt sum annaðmál" í Vágum skúlaárini 2022/23, 2023/24 og 2024/25, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ruth Vang var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

## 234/22 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrium

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.07.2021 | 196/21 | 21/02924-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.05.2022 | 111/22 | 21/02924-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 25.10.2022 | 207/22 | 21/02924-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 26.10.2022 | 272/22 | 21/02924-1 |
| 5 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 234/22 | 21/02924-1 |

**Upprunin til málið**
Økja plásskapasitetin á dagstovnaøkinum sum heild

**Lýsing av málinum**
Í 2019 var útboð um útbygging av tveimum dagstovnum – Dagstovninum á Hamrinum við tveimum stovum og Býlingshúsinum vesturi á Flat við fýra stovum. Býráðið samtykti í tí umfarinum bert at byggja út Býlingshúsið vesturi á Flat.

Stór útstykkingarætlan er í umbúna oman fyri Argjahamar. Í uppskoti hevur verið at byggja nýggjan stovn við síðuna av Dagstovninum á Hamrinum, men annar møguleiki er at taka uppaftur verkætlanina og tilboðið, sum Búsetur vann, um at byggja út Dagstovnin á Hamrinum tó broytt til fimm stovur, ið økir plásskapasitetin við 76 plássum (36 vøggustovupláss og 40 barnagarðsstovupláss).

<u>Lýsing av plásstørvi</u>
Gjørd er nýggj greining av plásstørvinum í Tórshavnar kommunu her og nú og komandi árini, sí skjal. Tilflyting og høg burðatøl seinastu árini gera, at átrokandi tørvur er á fleiri vøggu- og barnagarðsstovuplássum í kommununi bæði her og nú og komandi árini.

Í juni 2021 eru umleið 1.780 stovnspláss í Tórshavnar kommunu 0-6 ár. Talan er um umleið 560 vøggustovupláss og 1.220 barnagarðsstovupláss.

Sbrt. greiningini er tørvurin her og nú á 100-120 fleiri vøggustovuplássum og 90-100 fleiri barnagarðsstovuplássum. Tá er talt við, at á fleiri stovnum eru ov nógv børn inni enn stovnurin er bygdur til, at nógv børn eru 1,5-2 ár, áðrenn tey byrja á stovni (hava bíðað eftir plássi), og aftur onnur, sum eru á ynskilista uttan yvirhøvur at bílagt pláss í skipanini.

Verða hesi stovnsplássini útvegað afturat, hevði plásskapasiteturin verið 660-680 vøggustovupláss (560 í dag) og 1.310-1.320 barnagarðsstovupláss (1.220 í dag).

Um burðatølini árini 2022-2027 vera sum undanfarnu árini uml. 300 um árið og við somu tilflyting uml. 1,5% um árið, so veksur plásstørvurin eitt vet aftrat.

Aftrat avbjóðingini við plásstroti er starvsfólkatrot.

<u>Útbyggja plásskapasitetin</u>
Við Miðstovninum koma nýggj pláss aftrat væntandi um ársskiftið ella stutt eftir. Eftir summarfrítíðina lata nakrar stovur upp í Hoydølum, sum tó er tíðaravmarkað loysn.

Umframt verkætlanina á Hamrinum og seinni Dagstovninum á Argjum, eru aðrir dagstovnar, sum kunnu tillagast og byggjast út til tess at økja plásskapasitin. Hetta verður lýst nærri eftir summarfrítíðina eisini í hvønn mun tað loysir seg í mun til íløguna.

Stóri vøksturin í Hoyvík ger tað tó eisini alneyðugt at byggja nýggjan og helst ríkiliga stóran dagstovn har komandi árini.

Viðvíkjandi útbyggingarætlanini Dagstovnurin á Hamrinum er uppskot um at fáa í lag samráðing um heildararbeiðstøkusáttmála við Búsetur um broytta útbyggingarætlan við støði í tilboðnum frá 2019, sí kostnaðarmeting (skjal).

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Útstykkingarætlanin oman fyri Argjahamar
Vegatkoma frá rundkoyringini Glyvursvegur/Hamarin
Dagstovnurin á Argjum
Útbygging av Dagstovninum á Hamrinum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Upprit um tørvin á dagstovnaplássum nú og framyvir
Kostnaðarmeting/tilboð útbygging á Hamrinum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla nevndini til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar um heildararbeiðstøkusáttmála við Búsetur um broytta ætlan at byggja út Dagstovnin á Hamrinum við støði í tilboðnum frá 2019 at leggja aftur fyri nevndina.

**Mentamálanevndin 05. juli 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Mentamálanevndin 11. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Ìskoyti:**
Umsitingin hevur tikið upp samráðing um heildararbeiðstøkusáttmála við P/F Búsetur um broytta ætlan at byggja út Dagstovnin á Hamrinum við støði í tilboðnum frá 2019.

Tillagingar eru gjørdar í verkætlanini. Dagstovnurin á Hamrinum er broyttur til 3 barnagarðsstovur og 3 vøggustovur, felagsøki og køk, starvsfólkarúm í miðjuni í bygninginum. Støddin er uml. 1.297m2, 6 stovur tilsamans.

P/F Búsetur boðar frá, at teir klára at byggja dagstovnin fyri uppruna m2 kostnaðin við index regulering. Tá er byggingin í samsvari við byggiskrá frá 13-03-2019.

Avbjóðingar hava verið við atkomuvegi og parkeringsøki rundanum nýggja tilbygningin á Dagstovnin á Hamrinum, tí stórur hæddarmunur er á lendinum og trongt er at útbyggja verandi parkeringspláss.

Avtalað er við Búsetur at gera arbeiðsvegin niðan til komandi Dagstovnin á Hamrinum. Parkeringspláss og atkomuvegur er ikki við í hesum prosjekti, men ein heildarætlan er gjørd fyri økið, har ið hetta arbeiðið verður gjørt liðugt seinni.

Parkeringsviðurskiftini til núverandi Dagstovnin á Hamrinum eru sum nú er í minna lagi. Umsitingin mælir til, at parkerings- og trafikkviðurskiftini skulu vera nøktandi og loyst, áðrenn verkætlanin er liðug. Talan er um tvífaldan tørv av parkeringsplássum, sum fáast skulu til vega.

Uml. kr. 450.000 kr eru settar av í tilboðnum hjá P/F Búsetur til spælipláss. Hetta er ikki nøktandi til at gera eitt fullgjørt og nútíðarhóskandi spælipláss. Meiri peningur má tí setast av til hetta seinni.

Tilboð frá P/F Búsetur við indexregulering og við øllum er kr. 54.038.606,00 v/ kommunalum mvg.

Innanfyri ein samlaðan karm uppá kr. 57 mió mvg íroknað er fíggjað arbeiðsvegur, tryggingar, listprýði, íbindingar v.m.

Tó er atkomuvegur, parkeringspláss og liðugtgerð av spæliplássi ikki íroknað.

Í sambandi við útbyggingina er neyðugt at broyta byggisamtyktina fyri økið.

**Fígging**
Tøkur peningur er kr. 31.000.000 á íløgujáttan innan grein 3 Børn og ung. Møguleiki er at fíggja kr. 10.000.000 í fíggjarætlanini fyri 2023, og at játta restupphæddina uppá kr. 16.000.000 í fíggjarætlanini fyri 2024.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til, at:

- Samtykt verður at útbyggja Dagstovnin á Hamrinum eftir omanfyristandandi leisti.
- Umsitingin fær heimild at taka av tilboðnum og at gera heildararbeiðstøkusáttmála við P/F Búsetur um at byggja út Dagstovnum á Hamrinum.
- Játta samlaða kostnaðin á kr. 57.000.000, fíggjað soleiðis:
    - kr. 30.000.000 verða fluttar av stovnsnummar 3175, LK31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum,
    - 1.000.000 verða fluttar av stovnsnummar 3175, LK31013 Nýggjur dagstovnur á Argjum,
    - kr. 10.000.000 verða játtaðar í fíggjarætlanini fyri 2023,
    - restupphæddin kr. 16.000.000 verður játtað í fíggjarætlanini fyri 2024, og at

  - fíggingin verður flutt til nýggja verkætlan 3175, L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum.
- Heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at viðgera broyting av byggisamtyktini fyri økið.

At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 25. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið. Koma broytingar fyri skal málið fyri nevnd aftur.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Enmælt samtykt.

# 235/22 Hølisloysn til nýggja hádeild í Sankta Frans skúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 10.03.2022 | 26/22 | 22/00894-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 07.04.2022 | 29/22 | 22/00894-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 12.05.2022 | 37/22 | 22/00894-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 248/22 | 22/00894-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 25.10.2022 | 70/22 | 22/00894-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 26.10.2022 | 273/22 | 22/00894-1 |
| 7 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 235/22 | 22/00894-1 |

**Upprunin til málið**
Samtykt hjá býráðnum 24. feb. 2022 í máli 21/02652 Dagføring av skúlabygnaðinum í Tórshavnar kommunu um at stovnseta hádeild (8.fl og 9.fl) í Sankta Frans skúla – at byrja frá skúlaárinum 2023/24.

**Lýsing av málinum**
Samtyktin inniber at pr. skúlaársbyrjan 2023/24 skal skúlin rúma tveimum 8. fl. og frá 2024/24 tveimum 8. fl. og tveimum 9.fl. Í sambandi við eina hádeild er eisini tørvur á ymiskum hjáhølum eitt nú til bólkaarbeiði, goymsluhøli, betri fakstovuhentleikar, tænastuhentleikar v.m. Umframt – alt eftir staðseting v.m. – hentleikar til starvsfólk. Um talan er um eina varandi hølisloysn og alt eftir, hvussu og hvar bygningurin verður bygdur kann roknast við einum fermetratalið á minst 800 m2 (við fyrivarni!).

Í kommunuætlanin frá 2020 stendur viðv. Sankta Frans skúla:
*"Innan nøkur ár verður væntandi farið undir høvuðsumvæling og útbygging av skúlanum. Tørvur er á betri parkeringsviðurskiftum."*
og
*"Fleiri dagføringar og neyðugar umvælingar standa eisini fyri framman. Fremstir í røðini eru Hoyvíkar skúli og Sankta Frans skúli."*

Sostatt er greitt, at tað er skilagott at hava framtíðar høvuðsumvælingar í huga nú farið verður undir at útvega hølisloysn til hádeildina. Hetta serliga tí at verandi høvuðsbygningur er frá 1931 og 1956 og tískil í nógvum førum ikki uppfyllir nútíðar krøv til bygningar sbrt. BK17. Forskúla/frítíðarskúlabygningurin er frá 2013. Hóast høgan aldur á høvuðsbygninginum so er hann í lutfalsliga góðum standi.

Gerast skal eisini vart við, at ætlan um dagføring v.m. av Hoyvíkar skúla er útsett fleiri ferð og raðfest fremri enn dagføring av høvuðsbygninginum hjá Sankta Frans skúla.

**Øki**
Skúlabygningarnir liggja í einum D3 øki. Har er galdandi at byggistigið má innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki í D2 og D3 ikki fara upp um 0,25 og nýtslustigið ikki fara upp um 0,5. Skúlabygningarnir liggja á einum øki, ið er 6.985 m2 og byggistigið er á umleið 0,30 og nýtslustigið á umleið 0,59. Sostatt er greitt at byggisamtyktin ikki sum útgangsstøði loyvir meiri bygging á økinum. Harumframt er øki beint upp at D1 øki, ið er skógfriðað. Sostatt er sum útgangsstøði neyðugt at útvega annað lendi til tørvin. Í økinum er í høvuðsheitum tveir møguleikar – annar er at byggja út ella um á verandi øki og í øðrum lagi at byggja á økinum dagstovnurin Stella Maris heldur til. Hartil kemur spurningurin um møguliga eyka parkeringpláss. Hesir møguleikarnir kunnu innibera broytingum í byggisamtykt.

**Tíðarperspektiv**
Sum heild má tað ganga skjótt og væl um tað skal eydnast at hava eina varandi hølisloysn klára til skúlaársbyrjan 2022/23 og eigur tí eisini at vera umhugsað onkur fyribils loysn, ið verður brúkt inntil tann varandi loysnin fyriliggur. Helst eru onkrir møguleikar tí viðv. bæði viðv. fyribilshølum og evt. í nærøkinum.

Umsitingin kann – alt eftir samtykt í hesum máli – fara undir her í mars 2022 at gera eina kravseting til ein komandi og varandi hølisloysn og koma við boðum uppá staðsetingar. Á fundinum kemur umsitingin at geva metingar viðv. kostnaði av fyribils hølisloysn og varandi hølisloysn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, leiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at taka støðu til um farast skal:
a). fyrst undir fyrireikingar av eini varandi hølisloysn ella
b). eini fyribilsloysn, meðan ein verandi verður fyrireikað.

**Trivnaðarnevndin 10. mars 2022:** Samtykt at taka undir við punkt a) í tilmælinum.

**Ískoyti**:
Síðani samtyktina seinast er umsitingin farin undir fyrireikingar av eini kravfesting og virksemislýsing til eina komandi hølisloysn og hevur viðgjørt møguligar staðsetingar.

Eitt verkætlanartoymið er skipað við umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting, og er verkætlanarleiðari settur. Tveir fundir hava verið við skúlaleiðslu og umboð fyri starvsfólk í skúlanum, og í vikuni verður fundur við frítíðarskúlan.

**Staðsetingar**

Umsitingin metir, at mest upplagda staðseting til eina útbygging av Sankta Frans skúla er á stykkinum har dagstovnurin Stella Maris liggur – t.e. matr. 807b. Fremsti fyrimunurin er at har ber til at byggja at kalla ótarnað hvat viðv. verandi skúla- og frítíðarskúlavirksemi. Umframt at bygging har sum útgangsstøði ikki viðførir tørv á broyting ella fráviki frá byggisamtyktini. Um stykkið hjá TK á matr. 807g verður tikið við ber til at byggja eina bygning á 700-900 m2. í t.d 2 hæddum. Matr. 807g liggur tó, í mun til matr. 807b, í sethúsaøkið sbrt. almennu byggisamtyktini. Fyribils metingin er at hetta fermetratalið er nøktandi uttan 807g.

Alternativt skal byggjast í verandi øki har skúlin er. Har kunnu ymsar loysnir hugsast t.d. byggja omaná verandi forskúla- og frítíðarskúlabygningi ella taka burtur verandi fimleikahøll og byggja nýggja fimleikahøll/felagshøli og 2 hæddir omaná. Báðar hesar loysnirnar krevja broytta byggisamtykt vegna, at bæði byggi- og nýtslustigini eru rokkin, umframt tilgongd í mun til skógfriðingina við Viðarlundina, ið er næsti granni. Eisini eru arkitektonisk/estetisk atlit til verandi serstaka og søguliga skúlabygningin, og serstøku Mariukirkjuna og Kerit vestanfyri.

Tískil vil tað innibera eina longri tilgongd uppá umleið 6 mánaðir, og tí ikki vist um tað letur seg gera. Vansin í hesum báðum førum er, at talan er um bygging inn í einum virknum skúlaøki, og kemur tað at viðføra týðandi ampa og helst, at forskúla- og frítíðarskúlavirksemi má flytast úr hølunum, meðan tað mesta av byggingini fer fram.

Eitt heilt annað alternativ, ið eisini er umrøtt, er at keypa Sankta Jósefs barnagarðin og lata nýggjan dagstovn byggja á økinum hjá Stella Maris og so innrætta Sankta Jósefs barnagarð til skúla.

Hetta krevur í fyrsta lagi samráðingar við katólsku kirkjuna í Belgia, ið varðar av stovninum, og vil so aftur krevja aðra bygging, áðrenn farast kann undir tillaging av bygninginum til skúla. Tískil má roknast við at tilgongdin tekur longri tíð.

Í sambandi við útbygging má roknast við kravi frá byggivaldinum sbrt. BK17 um fleiri parkeringspláss. Skúlin fær við eini hádeild – umleið 12 nýggj starvsfólk (lærarar og onnur innan tænastuøkið). TK er í samskifti við KFUK um møguleikan fyri at gera 22 parkeringspláss niðast á trøðni hjá KFUK. Serskilt mál verður lagt fyri nevnd um tað.

**Slag av virksemi**
Umrøtt hevur verið hvørt tað hevði verið ein fyrimunur heldur at bygt nýggj høli til grunddeildina (forskúla – 3 fl.) ella partar av henni og møguliga frítíðarskúlan ístaðin fyri at byggja nýtt til hádeildina (8-9 fl. og evt. 7 fl.). Mett verður at tað avgjørt er nakað, ið skal greinast nærri komandi tíðina. Mett verður at fyrimunurin við at byggja nýtt til grunddeildina hinmegin Varðagøtu er, at grunddeildin ikki í ein stóran mun hevur tørv á fakhølum v.m. í høvuðsbygninginum eins og hádeildin hevur. Tá ein endalig niðurstøða fyriliggur um staðseting vil umsitingin koma við endaligum tilmæli um tann spurningin. Um nýggju hølini verða bygd til grunddeildina, skal smábarnaskúlin dagførast til 8-9 fl. ella annað, sum í dag er í høvuðsbygninginum. 7 fl. er vanliga partur av hádeildini, og tí er tað fyrimunur, men ikki treyt, at 7 fl. eisini hevur flokshøli har hádeildin er.

**Innihald/funktiónir v.m.**
Komið er væl áleiðis við at greina neyðugar funktiónir til ymisk hølir og virksemi í eini hádeild og ymiskar avleiddar tillagingar, ið eru neyðugar í verandi bygningum sambandi við fakhøli (t.d. alis- og evnafrøði), felagshøli, hjáhøli, útiøki v.m. Hetta alt í sambandi við nú- og framtíðartørv innan skúlavirksemi.

Um tað hinvegin verður avgjørt at byggja til nýggja grunddeild er lutfalsliga skjótt at broyta uppá tilgongdina, men vil tað framvegis innibera ymiskar tillagingar í sambandi við fakhøli v.m., umframt umstøður til fleiri starvsfólk. Harumframt er innleiðandi farið undir greiningar í mun til hentleikar í skúlagarðinum.

**Ávegis kostnaðarmeting**
Á fundinum verður greitt frá ávegis kostnaðarmeting fyri nýbygging.

Havast skal eisini í huga, at Sankta Frans skúli, óansæð omanfyristandandi, yvir komandi árini hevur tørv á játtanum til vanligt viðlíkahald og dagføringar, umframt at skúlin eigur at fáa atkomuviðurskiftini, eisini fyri rørslutarnað, upp til nútíðarkrøvini. Hetta skal neyturviligvís ikki verða partur av verkætlanin við hølum til hádeild, men at tann byggiskráin sum verður gjørd til ítøkiligu verkætlanina tekur hædd fyri omanfyristandandi.

**Tíðarætlan**
Sbrt. býarsamtyktini frá 24. februar 2022 ynskir býráðið, at "... Sankta Frans skúli verður tvísporaður skúli frá forskúla til 9. flokk frá skúla árinum 2023/2024, ...".

Verkætlanartoymið metir, at tað óansæð val av omanfyri lýstu møguleikum, verður sera torført at fáa úvega eitt liðugt byggjarí/hølisloysn til skúlabyrjan eftir summarsteðgin 2023. Skal málið røkkast eigur tað í tilgongdini beinanvegin at kannast at útvega fyribilshølir, í eitt fyribilstíðarskeið, sum verður fram til minst jólini 2023 ella allarhelst summarfrítíðina 2024.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekturin, deildarleiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til:

a). at samtykkja at útbygging av Sankta Frans skúla skal vera á matr. 807b.
b). at umrøða hvørt grunddeild ella hádeild skal byggjast á matr. 807b, við atliti til at umsitingin kemur við neyvari tilmæli um tað til komandi fund.

Málið verður beint í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd og fíggjarnevndina.
**Trivnaðarnevndin 07. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmæli a) um at útbyggingin av Sankta Frans skúla verður á matr. nr. 807b treytað av góðkenning frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Tilmælið b) varð umrøtt.

**Ískoyti:**
UMMR hevur hin 8. apríl 2022 góðkent, at Sankta Frans skúli frá skúlaárinum 2023/24 verður tvísporaður frá forskúla til og við 9 frá skúlaárinum 2023/24. Somuleiðis er góðkent, at Skúlin á Fløtum verður trýsporaður frá forskúla til og við 6. flokk og fýra sporaður frá 7. til 9. Flokk frá skúlaárinum 2023/24.

Trivnaðarnevndin samtykti 7. apríl 2022 at staðseta nýggju skúlaloysina til Sankta Frans á matr.nr. 807b, sum í dag er Stella Maris Vøggustova. Í málslýsingini framgongur, at krøv verða sett til at útvega fleiri parkeringspláss í tí sambandi.

Samskifti hevur verið við KFUK um nýtt parkeringspláss á teirra øki framvið Varðagøtu. Samskifti hevur eisini fevnt um ynski frá KFUK um betran av almennu atgongdini til KFUK-húsið og brúkinum av KFUK-bønum.

KFUK ynskir at varðveita og menna KFUK-bøin sum virksemisøki hjá KFUK og samstundis gera hann lutvíst atkomuligan fyri gjøgnumgongd hjá almenninginum, umframt gera ovara partin vælegnaðan til kavaskreiðing. Eisini ynskir KFUK at fáa skipaði og nøktandi parkeringsviðurskifti til egið virksemi og í økinum í sambandi við kommunala stovns- og skúlavirksemi, umframt almenna parkering.

Út frá tørvinum hjá bæði KFUK og kommununi er gjørt uppskot til avtalu um atgongd og brúksrætt til partar av økinum, meðan kommunan átekur sær uppgávuna at fremja og rinda fyri ávís verkløg, sí uppskot til avtalu. Endalig tilsøgn fyriliggur ikki frá KFUK.

KFUK hevur áhuga í at gera avtalu við kommunuan nú í sambandi við, at felagsskapurin fyllir 100 ár í juni. Avtalan hevur fíggjarligan kostnað við sær fyri kommununa, eingin ítøkilig kostnaðarmeting fyriliggur. Játtan er ikki tøk til útinnan av avtaluni, men eigur at verða tikið sum liður í ætlaða skúlabyggingini.

**Skjal**

- Uppskot til brúks- og samstarvavtalu millum KFUK og Tórshavnar kommunu

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, býarverkfrøðingurin, býararkitekturin, deildarleiðarin á bygningsdeildini og deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla nevndini til at samtykkja at gera brúks- og samstarvsavtalu við KFUK og at heimilia umsitingini at fáa til vega kostnaðarmeting sum grundarlag fyri seinni viðgerð av játtan og verkætlan.
**Trivnaðarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, samtykkir at bjóða arbeiðið út í total arbeiðstøku við einum fíggjarkarmi á í mesta lagi 30 mió. kr.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum tí málið ikki er nóg væl lýst.

**Ískoyti:**
í sambandi við málið um dagføring av skúlabygnað mál nr. 21/02652 sendi Tórshavnar kommuna Uttanríkis og mentamálaráðnum umsókn um broytingar í bygnaðinum viðvíkjandi Sankta Frans skúla, og verður í svari frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum boðað frá, at ráðið góðkennir ætlaðu broytingina, at Sankta Frans skúli frá skúlaárinum 2023/24 verður tvísporaður frá forskúla til og við 9. flokki.

**Bygningur til hádeild**
Tosað hevur verið um, at nýggi bygningurin kundi verið til grunddeildina og frítíðarskúla til forskúla, men í samráð við skúlan er niðurstøðan, at mælt verður til, at nýggi bygningurin verður bygdur til hádeildina, tvs. 7., 8. og 9. flokk, og at høli til alis- og evnafrøði verður í nýggja bygninginum, heldur enn at dagføra núverandi høli í høvuðsbygninginum, sum er til alisfrøði og til lívfrøði, til krøvini til alis- og evnafrøði í 8. og 9. flokki. Frítíðarskúlin í Sankta Frans ynskir at verða í lítla bygninginum i skúlagarðinum, heldur enn at flyta saman við grunddeildini í nýggjan bygning, sum eftir ætlan verður bygdur á økinum hjá Stella Maris.

7. flokkur verður roknaður sum partur av hádeildini, og nýggju skúlarnir í Tórshavnar kommunu eru bygdur soleiðis, at hvør deild hevur flokshøli í eind fyri seg. Tríggjar deildir eru í stóru skúlunum, tær eru grunddeild 1-3. fl., miðdeild 4.- 6. fl. og hádeild 7-9. fl. Í skúlum við forskúla, er forskúlin partur av grunddeildini. At deildirnar eru í somu eind, ger tað høgligari at arbeiða tvørtur um floksmørk, at skipa tiltøk á deildini, at samstarva bæði hjá næmingum og starvsfólkum og ikki minst at kenna seg sum eina eind.

At flokshølini hjá 7. flokki verða í nýggja bygninginum, gevur pláss fyri serflokkum í Sankta Frans skúla.

**Hølistørvur**
Samskift er við skúlastýrið og skúlans leiðslu um hølistørvin til tvísporaða hádeild 7.-9. fl., tvs. 6 flokkar. Harumframt skal gerast ein stova til alis- og evnafrøði. Aftrat koma aðrar vanligar hølisumstøður til starvsfólkarúm, næmingauppihald, ves, goymsla. Talan eru væntandi um byging uml. 1.100 fermetrar.

**Staðseting**
Skúlabygningurin verður bygdur á matr.nr. 807b. Ætlanin er, at aktomuviðurskifti og parkering verður frá Varðagøtu og til matr.nr. 807g, ið er kommunal ogn. Í hesum sambandi er ætlanin at gera avtalu við KFUK um verandi vegatkomu frá Varðagøtu um keyp og nýtslurætt til KFUK til parkering á matr.nr. 807g. Samskift verður eisini við ognina mat.nr. 807f um at keypa 220 m2 av stykkinum at leggja aftrat 807g. Fyrsta stig er at taka bygningin á matr.nr. 807b niður.

Hesar avtalur hava eisini týdning fyri tíðarætlanina og viðgerðina av byggisamtyktini fyri økið, sum má broytast, sí niðanfyri.

**Heimildir**
Sambært fólkaskúlalógini §57, stk. 4 góðkennir landsstýrimaðurin øll byggimál og allar útbyggingarætlanir, ásetur reglur byggimálum viðvíkjandi, og hvussu ein fólkaskúli verður innrættaður.

**Útiøki**
Útiøkini hjá skúlum skulu lagast til ymsu aldursbólkarnar, og nú hádeild verður í Sankta Frans skúla, er umráðandi, at umstøðurnar í skúlagarðinum vera góðar og eggja til spæl, læring og sosiala samveru. Útiøkið skal vera fjølbroytt og gjørt til ungfólk í aldrinum 13-16 ár. Útiøkið eigur at vera góður karmur um spæl, rørslu og uttandura læringsrúm, tað skal vera stimbrandi hjá næmingum og stuðla teimum í at røra seg. Hetta hevur týdning fyri trivnað, læru, motorik, vælveru og heilsa hjá tí einstaka.

**Byggisamtykt**
Sambært almennu byggisamtyktini kunnu ávikavist byggistigið og nýtslustigið, í D3-umráði, verða í mesta lagi 25 % og 50 % av grundøkjavíddini. Roknast kann við, at uml. 500-600 fermetrar fara til parkering. Útiøkini verða tí, um byggingin er í tveimum hæddum, uml. 1.600-1.700 fermetrar. Tað eru uml. 10 – 12 fermetrar fyri hvønn næming. Í verandi SFS eru uml. 14 fermetrar fyri hvønn næming. Danskar vegleiðingar viðmæla minst 50 fermetrar. Í Eysturskúlanum og Skúlanum á Fløtum eru ávikavist 21 og 31 fermetrar. Ein grundgeving fyri at tað kann góðtakast at hava so lítið útiøki til hádeildina í SFS er, at beint sunnan fyri skúla er trøðin hjá KFUK, sum í skúlatíðini kann verða tøk hjá næminginum í hádeildini.

Grundøkjavíddin skal økjast uml. 220 m2, har tað eftir uppskotinum er neyðugt við broyting í byggisamtyktini, tá A1 øki til sethús og D3 øki til almennar bygningar verða løgd saman.

**Tíðarætlan**
Fyrsta stigið verður at víðka um grundøkjavíddina, har Stella Maris er, so pláss verður til ein nýggjan skúlabygning. Umráðandi er eisini at fáa gjørt eina avtalu við KFUK um vegatkomuna frá Varðagøtu til KFUK, so hendan vegatkoman eisini verður til nýggja skúlabygningin. At avgreiða hesi viðurskifti hevur skund, tí tað er ein fyritreyt fyri, at býarskipanardeildin kann byrja tilgongd at broyta bygginsamtyktina fyri part av A1-økinum, vestan fyri matr.nr. 807b, so hesin partur verður partur av D3-økinum, líka sum matr.nr. 807b har Stella Maris er. Er einki óvæntað, tekur ein byggisamtyktarbroyting vanliga uml. 6 mánaðir at avgreiða.

Meðan omanfyri nevnda er í gongd, kann fyrireikingarbeiðið gerast til niðurtøkuna av verandi bygningi. Sambært niðurstøðu hjá leiðsluni, frá 20.01.2022, ið byggir á tilmæli frá uttanhýsis ráðgevum, loysir tað seg ikki at umvæla og dagføra verandi bygning.

Møguligt er eisini í sama tíðarskeiði at fremja sjálvt niðurtøkuarbeiðið umframt at umleggja og endurnýggja gomlu kloakkleiðingina sum liggur oman í gjøgnum grundøkið, har verandi bygningur stendur.

**Ætlað mannagongd og útbjóðing**
Tilgongdin at gera byggiskrá og avgreiða brúkaraviðurskiftini, herundir endaligt rúmskema, kann eisini fara fram í sama í sama tíðarskeiðið. Tað er í hesum sambandi umráðandi at fáa nágreinað alla útgerð, tekniskar skipanir, krøv til yvirflatur v.m. í rúmskema í byggiskrá. Byggiskráin skal haraftrat vísa til viðkomandi reglugerðir, kunngerðir, normar, SBI-vegleiðingar, aðrar vegleiðingar og krøv til arbeiðsumhvørvi. Herundir fastleggja málbar góðskustig.

Útbóðingartilfarið skal tryggja, at býarskipanarlig atlit verða tikin til umhvørvið á staðnum, t.d. at varðveita stóran part av verandi grótgarði og størru trøini. Eisini metir bygningsdeildin, at heildarbeiðstøkan, eins og í Skúlanum á Fløtum, ikki skal fevna um list, kunningarskelti, leyst innbúgv, teldur, skermar o.l. útgerð.

Á fíggjarnevndarfundi 19. okt. 2022 varð samtykt, “...at bjóða arbeiðið út í total arbeiðstøku...”. Hetta er at skilja sum heildararbeiðstøka. Her metir tekniska umsitingin, at leisturin eigur at verða soleiðis, at tíð og játtan beinanvegin eru tøk.

**Kostnaðarmeting**
Ein kostnaðarmeting er viðheft. Kostnaðarmetingin byggir á framskrivaðan fermetrakostnað fyri endaliga kostnaðin fyri Skúlan á Fløtum. Afturat er íroknað kostnaður fyri ymiskt, sum kemur afturat í hesi verkætlanini, samanborið við Skúlan á Fløtum.

Eingin játtan er sett av til fyrireiking til útboð. Kostnaðarmetingin at gera útbjóðingartilfar, sum inniheldur byggiskrá við rúmskema, nágreining av útgerð, tekniskum skipanum, krøv til yvirflatur v.m., umframt at vísa til viðkomandi reglugerðir, kunngerðir, normar, SBI-vegleiðingar, aðrar vegleiðingar og krøv til arbeiðsumhvørvi, herundir at fastleggja málbar góðskustig, og at útbóðingartilfarið tryggjar, at býarskipanarlig atlit verða tikin til umhvørvið á staðnum er mett til kr. 0,5 mió.

Eisini er eitt uppskot til tíðarætlan fyri 2022 og 2023, ætlanin er eisini viðheft.

**Hjáløgd skjøl:**
SFS kostnaðarmeting Uppskot 1 20221024
Rúmskema í gerð Fyribils 20220920
Tilmæli frá býarskipanardeildini í sambandi við hádeild til Sankta Frans skúla
Uppskot til tíðarætlan

Skjølini eru í skjalamappu 22/00894-23

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, leiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja:

a) at bygningur til hádeild hjá Sankta Frans skúla verður bygdur á 807b og 807g,
b) at gera útbjóðingartilfar, sum inniheldur byggiskrá og kravspesifikatión til skúlabygningin v.m. sum lýst omanfyri, og at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku,
c) at gera útbjóðingartilfar, at bjóða út og at taka av tilboði og gera sáttmála um arbeiðið at taka niður bygningin á matr.nr. 807b,
d) at játta kr. 0,5 mió av tøkum løgukarmi 4175 LK 41014 Dagføring, Skúlin við Løgmannabreyt, og stovna nýggja løgukontu 4176 Hádeild Sankta Frans skúli til at gera útbjóðingartilfarið pkt. b) og c), og
e) at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at viðgera broyting í byggisamtykt fyri økið.

Og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
í sambandi við málið um dagføring av skúlabygnað mál nr. 21/02652 sendi Tórshavnar kommuna Uttanríkis og mentamálaráðnum umsókn um broytingar í bygnaðinum viðvíkjandi Sankta Frans skúla, og verður í svari frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum boðað frá, at ráðið góðkennir ætlaðu broytingina, at Sankta Frans skúli frá skúlaárinum 2023/24 verður tvísporaður frá forskúla til og við 9. flokki.

**Bygningur til hádeild**
Tosað hevur verið um, at nýggi bygningurin kundi verið til grunddeildina og frítíðarskúla til forskúla, men í samráð við skúlan er niðurstøðan, at mælt verður til, at nýggi bygningurin verður bygdur til hádeildina, tvs. 7., 8. og 9. flokk, og at høli til alis- og evnafrøði verður í nýggja bygninginum, heldur enn at dagføra núverandi høli í høvuðsbygninginum, sum er til alisfrøði og til lívfrøði, til krøvini til alis- og evnafrøði í 8. og 9. flokki. Frítíðarskúlin í Sankta Frans ynskir at

verða í lítla bygninginum i skúlagarðinum, heldur enn at flyta saman við grunddeildini í nýggjan bygning, sum eftir ætlan verður bygdur á økinum hjá Stella Maris.

7. flokkur verður roknaður sum partur av hádeildini, og nýggju skúlarnir í Tórshavnar kommunu eru bygdur soleiðis, at hvør deild hevur flokshøli í eind fyri seg. Tríggjar deildir eru í stóru skúlunum, tær eru grunddeild 1-3. fl., miðdeild 4.- 6. fl. og hádeild 7-9. fl. Í skúlum við forskúla, er forskúlin partur av grunddeildini. At deildirnar eru í somu eind, ger tað høgligari at arbeiða tvørtur um floksmørk, at skipa tiltøk á deildini, at samstarva bæði hjá næmingum og starvsfólkum og ikki minst at kenna seg sum eina eind.

At flokshølini hjá 7. flokki verða í nýggja bygninginum, gevur pláss fyri serflokkum í Sankta Frans skúla.

**Hølistørvur**
Samskift er við skúlastýrið og skúlans leiðslu um hølistørvin til tvísporaða hádeild 7.-9. fl., tvs. 6 flokkar. Harumframt skal gerast ein stova til alis- og evnafrøði. Aftrat koma aðrar vanligar hølisumstøður til starvsfólkarúm, næmingauppihald, ves, goymsla. Talan eru væntandi um byging uml. 1.100 fermetrar.

**Staðseting**
Skúlabygningurin verður bygdur á matr.nr. 807b. Ætlanin er, at aktomuviðurskifti og parkering verður frá Varðagøtu og til matr.nr. 807g, ið er kommunal ogn. Í hesum sambandi er ætlanin at gera avtalu við KFUK um verandi vegatkomu frá Varðagøtu um keyp og nýtslurætt til KFUK til parkering á matr.nr. 807g. Samskift verður eisini við ognina mat.nr. 807f um at keypa 220 m2 av stykkinum at leggja aftrat 807g. Fyrsta stig er at taka bygningin á matr.nr. 807b niður.

Hesar avtalur hava eisini týdning fyri tíðarætlanina og viðgerðina av byggisamtyktini fyri økið, sum má broytast, sí niðanfyri.

**Heimildir**
Sambært fólkaskúlalógini §57, stk. 4 góðkennir landsstýrimaðurin øll byggimál og allar útbyggingarætlanir, ásetur reglur byggimálum viðvíkjandi, og hvussu ein fólkaskúli verður innrættaður.

**Útiøki**
Útiøkini hjá skúlum skulu lagast til ymsu aldursbólkarnar, og nú hádeild verður í Sankta Frans skúla, er umráðandi, at umstøðurnar í skúlagarðinum vera góðar og eggja til spæl, læring og sosiala samveru. Útiøkið skal vera fjølbroytt og gjørt til ungfólk í aldrinum 13-16 ár. Útiøkið eigur at vera góður karmur um spæl, rørslu og uttandura læringsrúm, tað skal vera stimbrandi hjá næmingum og stuðla teimum í at røra seg. Hetta hevur týdning fyri trivnað, læru, motorik, vælveru og heilsa hjá tí einstaka.

**Byggisamtykt**
Sambært almennu byggisamtyktini kunnu ávikavist byggistigið og nýtslustigið, í D3-umráði, verða í mesta lagi 25 % og 50 % av grundøkjavíddini. Roknast kann við, at uml. 500-600 fermetrar fara til parkering. Útiøkini verða tí, um byggingin er í tveimum hæddum, uml. 1.600-1.700 fermetrar. Tað eru uml. 10 – 12 fermetrar fyri hvønn næming. Í verandi SFS eru uml. 14 fermetrar fyri hvønn næming. Danskar vegleiðingar viðmæla minst 50 fermetrar. Í Eysturskúlanum og Skúlanum á Fløtum eru ávikavist 21 og 31 fermetrar. Ein grundgeving fyri at tað kann góðtakast at hava so lítið útiøki til hádeildina í SFS er, at beint sunnan fyri skúla er trøðin hjá KFUK, sum í skúlatíðini kann verða tøk hjá næminginum í hádeildini.

Grundøkjavíddin skal økjast uml. 220 m2, har tað eftir uppskotinum er neyðugt við broyting í byggisamtyktini, tá A1 øki til sethús og D3 øki til almennar bygningar verða løgd saman.

**Tíðarætlan**

Fyrsta stigið verður at víðka um grundøkjavíddina, har Stella Maris er, so pláss verður til ein nýggjan skúlabygning. Umráðandi er eisini at fáa gjørt eina avtalu við KFUK um vegatkomuna frá Varðagøtu til KFUK, so hendan vegatkoman eisini verður til nýggja skúlabygningin. At avgreiða hesi viðurskifti hevur skund, tí tað er ein fyritreyt fyri, at býarskipanardeildin kann byrja tilgongd at broyta bygginsamtyktina fyri part av A1-økinum, vestan fyri matr.nr. 807b, so hesin partur verður partur av D3-økinum, líka sum matr.nr. 807b har Stella Maris er. Er einki óvæntað, tekur ein byggisamtyktarbroyting vanliga uml. 6 mánaðir at avgreiða.

Meðan omanfyri nevnda er í gongd, kann fyrireikingarbeiðið gerast til niðurtøkuna av verandi bygningi. Sambært niðurstøðu hjá leiðsluni, frá 20.01.2022, ið byggir á tilmæli frá uttanhýsis ráðgevum, loysir tað seg ikki at umvæla og dagføra verandi bygning.

Møguligt er eisini í sama tíðarskeiði at fremja sjálvt niðurtøkuarbeiðið umframt at umleggja og endurnýggja gomlu kloakkleiðingina sum liggur oman í gjøgnum grundøkið, har verandi bygningur stendur.

**Ætlað mannagongd og útbjóðing**
Tilgongdin at gera byggiskrá og avgreiða brúkaraviðurskiftini, herundir endaligt rúmskema, kann eisini fara fram í sama í sama tíðarskeiðið. Tað er í hesum sambandi umráðandi at fáa nágreinað alla útgerð, tekniskar skipanir, krøv til yvirflatur v.m. í rúmskema í byggiskrá. Byggiskráin skal haraftrat vísa til viðkomandi reglugerðir, kunngerðir, normar, SBI-vegleiðingar, aðrar vegleiðingar og krøv til arbeiðsumhvørvi. Herundir fastleggja málbar góðskustig.

Útbóðingartilfarið skal tryggja, at býarskipanarlig atlit verða tikin til umhvørvið á staðnum, t.d. at varðveita stóran part av verandi grótgarði og størru trøini. Eisini metir bygningsdeildin, at heildarbeiðstøkan, eins og í Skúlanum á Fløtum, ikki skal fevna um list, kunningarskelti, leyst innbúgv, teldur, skermar o.l. útgerð.

Á fíggjarnevndarfundi 19. okt. 2022 varð samtykt, "...at bjóða arbeiðið út í total arbeiðstøku...". Hetta er at skilja sum heildararbeiðstøka. Her metir tekniska umsitingin, at leisturin eigur at verða soleiðis, at tíð og játtan beinanvegin eru tøk.

**Kostnaðarmeting**
Ein kostnaðarmeting er viðheft. Kostnaðarmetingin byggir á framskrivaðan fermetrakostnað fyri endaliga kostnaðin fyri Skúlan á Fløtum. Afturat er íroknað kostnaður fyri ymiskt, sum kemur afturat í hesi verkætlanini, samanborið við Skúlan á Fløtum.

Eingin játtan er sett av til fyrireiking til útboð. Kostnaðarmetingin at gera útbjóðingartilfar, sum inniheldur byggiskrá við rúmskema, nágreining av útgerð, tekniskum skipanum, krøv til yvirflatur v.m., umframt at vísa til viðkomandi reglugerðir, kunngerðir, normar, SBI-vegleiðingar, aðrar vegleiðingar og krøv til arbeiðsumhvørvi, herundir at fastleggja málbar góðskustig, og at útbóðingartilfarið tryggjar, at býarskipanarlig atlit verða tikin til umhvørvið á staðnum er mett til kr. 0,5 mió.

Eisini er eitt uppskot til tíðarætlan fyri 2022 og 2023, ætlanin er eisini viðheft.

**Hjáløgd skjøl:**
SFS kostnaðarmeting Uppskot 1 20221024
Rúmskema í gerð Fyribils 20220920
Tilmæli frá býarskipanardeildini í sambandi við hádeild til Sankta Frans skúla
Uppskot til tíðarætlan

Skjølini eru í skjalamappu 22/00894-23

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, leiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja:

f) at bygningur til hádeild hjá Sankta Frans skúla verður bygdur á 807b og 807g,
g) at gera útbjóðingartilfar, sum inniheldur byggiskrá og kravspesifikatión til skúlabygningin v.m. sum lýst omanfyri, og at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku,
h) at gera útbjóðingartilfar, at bjóða út og at taka av tilboði og gera sáttmála um arbeiðið at taka niður bygningin á matr.nr. 807b,
i) at játta kr. 0,5 mió av tøkum løgukarmi 4175 LK 41014 Dagføring, Skúlin við Løgmannabreyt, og stovna nýggja løgukontu 4176 Hádeild Sankta Frans skúli til at gera útbjóðingartilfarið pkt. b) og c), og
j) at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at viðgera broyting í byggisamtykt fyri økið.

Og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
í sambandi við málið um dagføring av skúlabygnað mál nr. 21/02652 sendi Tórshavnar kommuna Uttanríkis og mentamálaráðnum umsókn um broytingar í bygnaðinum viðvíkjandi Sankta Frans skúla, og verður í svari frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum boðað frá, at ráðið góðkennir ætlaðu broytingina, at Sankta Frans skúli frá skúlaárinum 2023/24 verður tvísporaður frá forskúla til og við 9. flokki.

**Bygningur til hádeild**
Tosað hevur verið um, at nýggi bygningurin kundi verið til grunddeildina og frítíðarskúla til forskúla, men í samráð við skúlan er niðurstøðan, at mælt verður til, at nýggi bygningurin verður bygdur til hádeildina, tvs. 7., 8. og 9. flokk, og at høli til alis- og evnafrøði verður í nýggja bygninginum, heldur enn at dagføra núverandi høli í høvuðsbygninginum, sum er til alisfrøði og til lívfrøði, til krøvini til alis- og evnafrøði í 8. og 9. flokki. Frítíðarskúlin í Sankta Frans ynskir at verða í lítla bygninginum i skúlagarðinum, heldur enn at flyta saman við grunddeildini í nýggjan bygning, sum eftir ætlan verður bygdur á økinum hjá Stella Maris.

7. flokkur verður roknaður sum partur av hádeildini, og nýggju skúlarnir í Tórshavnar kommunu eru bygdur soleiðis, at hvør deild hevur flokshøli í eind fyri seg. Tríggjar deildir eru í stóru skúlunum, tær eru grunddeild 1-3. fl., miðdeild 4.- 6. fl. og hádeild 7-9. fl. Í skúlum við forskúla, er forskúlin partur av grunddeildini. At deildirnar eru í somu eind, ger tað høgligari at arbeiða tvørtur um floksmørk, at skipa tiltøk á deildini, at samstarva bæði hjá næmingum og starvsfólkum og ikki minst at kenna seg sum eina eind.

At flokshølini hjá 7. flokki verða í nýggja bygninginum, gevur pláss fyri serflokkum í Sankta Frans skúla.

**Hølistørvur**
Samskift er við skúlastýrið og skúlans leiðslu um hølistørvin til tvísporaða hádeild 7.-9. fl., tvs. 6 flokkar. Harumframt skal gerast ein stova til alis- og evnafrøði. Aftrat koma aðrar vanligar hølisumstøður til starvsfólkarúm, næmingauppihald, ves, goymsla. Talan eru væntandi um byging uml. 1.100 fermetrar.

**Staðseting**
Skúlabygningurin verður bygdur á matr.nr. 807b. Ætlanin er, at aktomuviðurskifti og parkering verður frá Varðagøtu og til matr.nr. 807g, ið er kommunal ogn. Í hesum sambandi er ætlanin at gera avtalu við KFUK um verandi vegatkomu frá Varðagøtu um keyp og nýtslurætt til KFUK til parkering á matr.nr. 807g. Samskift verður eisini við ognina mat.nr. 807f um at keypa 220 m2 av stykkinum at leggja aftrat 807g. Fyrsta stig er at taka bygningin á matr.nr. 807b niður.

Hesar avtalur hava eisini týdning fyri tíðarætlanina og viðgerðina av byggisamtyktini fyri økið, sum má broytast, sí niðanfyri.

**Heimildir**
Sambært fólkaskúlalógini §57, stk. 4 góðkennir landsstýrimaðurin øll byggimál og allar útbyggingarætlanir, ásetur reglur byggimálum viðvíkjandi, og hvussu ein fólkaskúli verður innrættaður.

**Útiøki**
Útiøkini hjá skúlum skulu lagast til ymsu aldursbólkarnar, og nú hádeild verður í Sankta Frans skúla, er umráðandi, at umstøðurnar í skúlagarðinum vera góðar og eggja til spæl, læring og sosiala samveru. Útiøkið skal vera fjølbroytt og gjørt til ungfólk í aldrinum 13-16 ár. Útiøkið eigur at vera góður karmur um spæl, rørslu og uttandura læringsrúm, tað skal vera stimbrandi hjá næmingum og stuðla teimum í at røra seg. Hetta hevur týdning fyri trivnað, læru, motorik, vælveru og heilsa hjá tí einstaka.

**Byggisamtykt**
Sambært almennu byggisamtyktini kunnu ávikavist byggistigið og nýtslustigið, í D3-umráði, verða í mesta lagi 25 % og 50 % av grundøkjavíddini. Roknast kann við, at uml. 500-600 fermetrar fara til parkering. Útiøkini verða tí, um byggingin er í tveimum hæddum, uml. 1.600-1.700 fermetrar. Tað eru uml. 10 – 12 fermetrar fyri hvønn næming. Í verandi SFS eru uml. 14 fermetrar fyri hvønn næming. Danskar vegleiðingar viðmæla minst 50 fermetrar. Í Eysturskúlanum og Skúlanum á Fløtum eru ávikavist 21 og 31 fermetrar. Ein grundgeving fyri at tað kann góðtakast at hava so lítið útiøki til hádeildina í SFS er, at beint sunnan fyri skúla er trøðin hjá KFUK, sum í skúlatíðini kann verða tøk hjá næminginum í hádeildini.

Grundøkjavíddin skal økjast uml. 220 m2, har tað eftir uppskotinum er neyðugt við broyting í byggisamtyktini, tá A1 øki til sethús og D3 øki til almennar bygningar verða løgd saman.

**Tíðarætlan**
Fyrsta stigið verður at víðka um grundøkjavíddina, har Stella Maris er, so pláss verður til ein nýggjan skúlabygning. Umráðandi er eisini at fáa gjørt eina avtalu við KFUK um vegatkomuna frá Varðagøtu til KFUK, so hendan vegatkoman eisini verður til nýggja skúlabygningin. At avgreiða hesi viðurskifti hevur skund, tí tað er ein fyritreyt fyri, at býarskipanardeildin kann byrja tilgongd at broyta bygginsamtyktina fyri part av A1-økinum, vestan fyri matr.nr. 807b, so hesin partur verður partur av D3-økinum, líka sum matr.nr. 807b har Stella Maris er. Er einki óvæntað, tekur ein byggisamtyktarbroyting vanliga uml. 6 mánaðir at avgreiða.

Meðan omanfyri nevnda er í gongd, kann fyrireikingarbeiðið gerast til niðurtøkuna av verandi bygningi. Sambært niðurstøðu hjá leiðsluni, frá 20.01.2022, ið byggir á tilmæli frá uttanhýsis ráðgevum, loysir tað seg ikki at umvæla og dagføra verandi bygning.

Møguligt er eisini í sama tíðarskeiði at fremja sjálvt niðurtøkuarbeiðið umframt at umleggja og endurnýggja gomlu kloakkleiðingina sum liggur oman í gjøgnum grundøkið, har verandi bygningur stendur.

**Ætlað mannagongd og útbjóðing**
Tilgongdin at gera byggiskrá og avgreiða brúkaraviðurskiftini, herundir endaligt rúmskema, kann eisini fara fram í sama í sama tíðarskeiðið. Tað er í hesum sambandi umráðandi at fáa nágreinað alla útgerð, tekniskar skipanir, krøv til yvirflatur v.m. í rúmskema í byggiskrá. Byggiskráin skal haraftrat vísa til viðkomandi reglugerðir, kunngerðir, normar, SBI-vegleiðingar, aðrar vegleiðingar og krøv til arbeiðsumhvørvi. Herundir fastleggja málbar góðskustig.

Útbóðingartilfarið skal tryggja, at býarskipanarlig atlit verða tikin til umhvørvið á staðnum, t.d. at varðveita stóran part av verandi grótgarði og størru trøini. Eisini metir bygningsdeildin, at heildarbeiðstøkan, eins og í Skúlanum á Fløtum, ikki skal fevna um list, kunningarskelti, leyst innbúgv, teldur, skermar o.l. útgerð.

Á fíggjarnevndarfundi 19. okt. 2022 varð samtykt, “...at bjóða arbeiðið út í total arbeiðstøku...”. Hetta er at skilja sum heildararbeiðstøka. Her metir tekniska umsitingin, at leisturin eigur at verða soleiðis, at tíð og játtan beinanvegin eru tøk.

**Kostnaðarmeting**
Ein kostnaðarmeting er viðheft. Kostnaðarmetingin byggir á framskrivaðan fermetrakostnað fyri endaliga kostnaðin fyri Skúlan á Fløtum. Afturat er íroknað kostnaður fyri ymiskt, sum kemur afturat í hesi verkætlanini, samanborið við Skúlan á Fløtum.

Eingin játtan er sett av til fyrireiking til útboð. Kostnaðarmetingin at gera útbjóðingartilfar, sum inniheldur byggiskrá við rúmskema, nágreining av útgerð, tekniskum skipanum, krøv til yvirflatur v.m., umframt at vísa til viðkomandi reglugerðir, kunngerðir, normar, SBI-vegleiðingar, aðrar vegleiðingar og krøv til arbeiðsumhvørvi, herundir at fastleggja málbar góðskustig, og at útbóðingartilfarið tryggjar, at býarskipanarlig atlit verða tikin til umhvørvið á staðnum er mett til kr. 0,5 mió.

Eisini er eitt uppskot til tíðarætlan fyri 2022 og 2023, ætlanin er eisini viðheft.

**Hjáløgd skjøl:**
SFS kostnaðarmeting Uppskot 1 20221024
Rúmskema í gerð Fyribils 20220920
Tilmæli frá býarskipanardeildini í sambandi við hádeild til Sankta Frans skúla
Uppskot til tíðarætlan

Skjølini eru í skjalamappu 22/00894-23

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, leiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja:

k) at bygningur til hádeild hjá Sankta Frans skúla verður bygdur á 807b og 807g,
l) at gera útbjóðingartilfar, sum inniheldur byggiskrá og kravspesifikatión til skúlabygningin v.m. sum lýst omanfyri, og at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku,
m) at gera útbjóðingartilfar, at bjóða út og at taka av tilboði og gera sáttmála um arbeiðið at taka niður bygningin á matr.nr. 807b,
n) at játta kr. 0,5 mió av tøkum løgukarmi 4175 LK 41014 Dagføring, Skúlin við Løgmannabreyt, og stovna nýggja løgukontu 4176 Hádeild Sankta Frans skúli til at gera útbjóðingartilfarið pkt. b) og c), og
o) at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at viðgera broyting í byggisamtykt fyri økið.

Og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 25. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við pkt. a) og e), og at bjóða út í heildararbeiðstøku byggingina av skúlabygningi uml. 1.100 m2 umframt útiøki v.m., innanfyri ein karm uppá kr. 30 mió, harímillum at gera byggiskrá við kravspesifikatión, og at taka niður og burturbeina verandi bygning á matr.nr. 807b, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 26. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

## 236/22 Fríksúlin í Havn: Umsókn at stovna forskúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 20.09.2022 | 56/22 | 22/03166-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 249/22 | 22/03166-5 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 236/22 | 22/03166-5 |

**Upprunin til málið**
Stýrisformaðurin í stýrinum fyri Fрískúlan í Havn søkir í teldubrævið dagfest 20. juni 2022 um forskúla í fрískúlanum.

**Lýsing av málinum**
Frá skúlaárinum 2023/24 er ynski at stovna forskúla í Fрískúlanum í Havn.

Í umsóknini stendur m.a.:" Forskúlin skal tryggja børnunum eina blíða byrjan á skúlalívið, og skal virka sum ein millumliður millum barnagarð/dagstovn og skúla. Barnið skal koma at kenna umstøðurnar og merkja at tey eru partur av einari skipaðari læritilgongd. Á henda hátt verður brúgv bygd frá dagstovni til skúla."

Námsætlanin skal fylgja kunngerð nr. 108 frá 8. august 2013 um skipan og læring í forskúla, og ætlanin er at skipa dagin soleiðis, at børnini kunnu møta frá kl. 07.40, kl. 08 byrjar skúladagurin so við morgunfundi, undirvísing/fakligt innihald, matarsteðgi, stillaløtu, framhald av fakliga arbeiðinum og morgunsangi. Síðani er útispæl og at enda matarsteðgur. Kl. 12.30-17.00 er frítíðarskúli.

Fрískúlin í Havn er skipaður sum eitt heildagstilboð við undirvísing og, fríløtum og frítíðaransing.

Í Tórshavnar kommunu eru í løtuni fimm forskúlar, fýra í kommunalum skúlum og ein í fрískúla. Forskúlar eru í Sankta Frans skúla, í Skúlanum á Argjahamri, í Skúlanum á Fløtum, í Kaldbaks skúla og í Lítlaskúla. Haraftrat er samtykt, at forskúli verður í Eysturskúlanum, og hann byrjar í august 2023.

Tímajáttanin til forskúlarnar í Tórshavnar kommunu eru 4 tímar um dagin. Forskúlin í Skúlanum á Fløtum hevur tó 5 tímar um dagin.

Forskúlalíknandi tilboð er skipað tilboð millum skúla og dagstovn, har tey 6 ára gomlu børnini eru í skúla tveir tímar um dagin. Forskúlalíknandi tilboð byrjaði í Nólsoy í august 2017, og søkt er um, at forskúlalíknandi tilboð verður í Velbastaðar skúla frá skúlaárinum 2023/24.

**Forskúli byrjaði í Kaldbaks skúla hetta skúlaárið, og góðkenningin frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum er fyribils galdandi í tvey ár. Tað er serliga tí, at næmingatalið er so lágt, at játtanin frá**

**Uttanríkis- og mentamálaráðnum er at skipa forskúlaflokk í Kaldbaks skúla sum eina royndarskipan næstu tvey skúlaárini.**

**Á býráðsfundi 24. februar 2022 varð samtykt, at forskúlar verða skipaðir í øllum kommunalu skúlunum. Í hesum føri er ikki talan um ein kommunalan skúla, men ein fríksúla**

**Sambært § 6 í kunngerðini um skipan og læring í forskúla, kunngerð nr. 108 frá 8. august 2013, kann forskúlaflokkur verða stovnaður, tá 12 børn eru í flokkinum, tó kann undantak gerast í smærru skúlunum.**

Sambært fólkaskúlalógini § 4 stk. 4 kann verða loyvt at seta 1 árs forskúlaflokk/ar á stovn eftir gjøllari reglum, sum landsstýrismaðurin setur. Í § 30 stk. 3 stendur, at undirvísingin í ávikavist forskúlaflokki, 1. og 2. skúlaári ella 1., 2. og 3. skúlaári kann lutvís verða samskipað. Á hesum somu floksstigum kann øll undirvísingin í teimum smáu skúlunum verða samskipað.

Sambært lógini um fríksúlar § 2 stk. 2 kann landsstýrismaðurin geva loyvi til, at forskúlaflokkar eisini koma undir lógina. Sambært § 18 stk. 6 er kommununnar stuðul til forskúlaflokkar, sum verða góðkendir sbrt. § 2, stk. 2, er 85% av rakstrarútreiðslunum, íroknað útreiðslur til skrivstovuhald og 85% av útreiðslunum til læraralønir og námsfrøðingalønir.

**Forskúli við tilhoyrandi frítíðarskúla er í fríksúlanum Lítlaskúla, tað tilboðið kom áðrenn ásetingina í lógini um, at forskúlaflokkar kunnu stovnast í fríksúlum. Tá var niðurstøðan, at kommunan rindar hesi tilboð 100% við støði í eindarkostnaðinum, ið kommunan hevur á ávikavist forskúlatilboðnum og frítíðarskúlatilboðnum til forskúla. Foreldragjaldið, sum kommunan tekur inn, er tað sama, sum í kommunalu forskúlunum og frítíðarskúlunum til forskúla, tilsamans er tað sama sum foreldragjald fyri barnagarðspláss.**

**Stýrið fyri fríksúlan í Havn metir, at 8 børn verða skrivað inn í forskúlan skúlaárið 2023/24 og metir, at árið eftir verða 12 skrivað inn í forskúlan. Skúlin leggur dent á, at hann er ein lítil skúli, og at tað er viðkomandi at meta og viðgera fríksúlan sum ein lítlan skúla.**

**Skúlaárið 2022/23 er næmingatalið í Fríksúlanum í Havn 16. Millum eitt og fimm børn eru í hvørjum árgangi.**

**Útreiðslurnar fyri hvørt barn í forskúla eru uml. 46 tkr. Um forskúli verður játtaður Fríksúlanum í Havn, skal støða eisini takast til, um**

**játtanin skal vera 85% av rakstrarútreiðslunum ella 100% av rakstrarútreiðslunum.**

## Um Tórshavnar kommuna samtykkir at játta fígging til forskúla í Frískúlanum í Havn, so er tað stýrið fyri skúlan, sum søkir Uttanríkis- og mentamálaráðið um loyvi at seta á stovn forskúla í Frískúlanum í Havn, tí talan er um ein frískúla

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. Juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022

Løgtingslóg nr. 46 frá 26. mars 2002 um frískúlar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 4. mai 2022

Kunngerð nr. 108 frá 8. august 2013 um skipan og læring í forskúla

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til:

a) at játta umsóknini treytað av, at næmingatalið fyrsta árið verður í minsta lagi 8 og eftirfylgjandi árini í minsta lagi 12, og at tímatalið verður 20 undirvísingartímar um vikuna
b) at stuðulin verður sum til forskúla í Lítlaskúla 100% av rakstarútreiðslunum
c) at frítíðarskúlin verður víðkaður til forskúlabørnini

**Trivnaðarnevndin 20. september 2022: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

## 237/22 Fíggjarstøðan hjá Skúlanum á Fløtum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 20.09.2022 | 58/22 | 22/04616-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 220/22 | 22/04616-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 237/22 | 22/04616-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarstøðan

**Lýsing av málinum**
Skúlin á Fløtum hevði við ársenda 2021 eina meirnýtslu uppá tkr. 2.240, svarandi til 20%. Lønarjáttanin hevur eina meirnýtslu uppá tkr. 712 (11%) og konta 14 keyp av vørum og tænastum hevur eina meirnýtslu uppá tkr. 1967 (40%).

2021 var fyrsta árið í nýggja skúlanum. Røð av viðurskiftum gera, at skúlin hevur ikki hildið játtanina og hevur borið útreiðslur antin vegna manglar í bygninginum, manglandi innbúgvi, manglandi húsavørði og ov lítið sett av til reingerð. Flytingin av 4-10 tilboðnum út á Argir gjørdist tkr. 500 dýrari enn játtaða fíggingin.

Fyri nógv av hesum er talan um eingangsútreiðslur. Men ein partur er eisini at fáa rætta uppá fíggjarætlanina, so hon svarar til veruligu útreiðslurnar, nú bygningurin og virksemi er komið í javna legu. Hetta er mest sjónligt í játtanini til reingerð, har staðfest er stórt ósamsvar við játtanina. Til fíggjarætlanina 2023 er játtanin í uppskoti hækkað við tkr. 836.

Skúlin sjálvur vil bera ymsar útreiðslur so sum tillagingar í bygninginum, bráðfeingis húsavørð v.m., men at kommunan letur eykajáttan til undirfíggingina av reingerð og reinførisvørum (tilsamans tkr. 800). Metast má rímiligt, at kommunan fíggjar meirkostnaðin at flyta 4-10 tilboðið (tkr. 500) og manglandi innbúgv (tkr. 400). Tilsamans tkr. 1.700.

Um so verður, metir skúlin at fáa meirnýtsluna burtur og raksturin verður sunnur í fíggjarárinum 2023.

Skúlin ger eisini vart við, at nýggja sáttmálan við NÁM um undirvísingartilfar er fíggjarliga ikki til fyrimunar fyri skúlan, tí hon er væl dýrari enn skipanin áðrenn, og skúlin ynskir at sleppa úr avtaluni. Talan er um sáttmála millum NÁM og Kommunufelagið, sum er bindandi fyri kommununa.

Á grein 4 og innan játtanir, sum trivnaðarnevndin varðar av, er ikki tøk játtan til hesa eykajáttan.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 4117 | | Skúlin á Fløtum | |

| **Upphædd** |
|---|
| 1.700.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at útvega Skúlanum á Fløtum konta 4117 eykajáttan tkr. 1.700.

**Trivnaðarnevndin 20. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á fíggjarnevndina at finna fígging.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og fíggja soleiðis,

L2375 LK23002 Tannlæknasstovan kr. 1.000.000
L5775 LK57033 Byrsumúli kr. 700.000

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

# 238/22 Keyp av lendi á Argjum, matr.nr 122h

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2022 | 189/22 | 14/00762-44 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 252/22 | 14/00762-44 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 238/22 | 14/00762-44 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við at gøtan frá Hamrinum oman á Borgartún skuldi gerast í 1996, so avtalaði táverandi býararktiektur við eigara av matr.nr. 122h, at gøtan kundi liggja partvís inni á teirra stykki, við teirri treyt at vegur til bil varð gjørdur til stykkið frá Borgartúni. Gøtan varð gjørd og liggur gjøgnum matr.nr. 122h, men varð vegurin ongantíð gjørdur.

Málið hevur síðani verið í hondum á sakførarum fyri báðar partar. Tíðin gongur, men einki hendir viðv. at fáa gjørt ein veg til matrikulin. Harumframt ynskti eigarin av matr. nr. 122h, at gøtan varð matrikulerað frá hennara stykki, og at hon fekk endurgjald fyri tað, sum kommunan ketiir – hetta varð heldur ongantíð avviklað.

Umsitingin hevur síðani viðgjørt vegin og fer staðiliga at mæla frá at gera veg niðan til ognina. Hetta er grundað á, at vegurin verður sera brattur, uml. 200 ‰, har kommunan helst vil halda seg undir 120 ‰. Somuleiðis eru umstøðurnar í lendinum soleiðis háttaðar, at lendið skal tillagast rættiliga nógv, umframt at neyðugt verður at gera inntriv á grannaognirnar. Somuleiðis verður mett, at útreiðslurnar at halda ein tílíkan veg við líka eru óneyðuga stórar.

**Lýsing av málinum**
Av tí at kommunan ikki hevur hildið seg til upprunaligu ætlanina/avtaluna at gera veg niðan til ognina, so mæla umsitingin til, at kommunan ognar sær matr. nr. 122h og leggur matrikulin afturat viðarlundaætlanini, sum er í umbúnað.

Matrikuleigari tekur undir við, at kommunan keypir lendið aftur, um kostnaðurin verður tann sami, sum hann varð keyptur fyri – áljóðandi 150 kr./$m^2$, sí fylgiskjøl 14/00762-47, sum sýnir prógv fyri keyps prísin.

Tinglýsta støddin á matr. nr. 122h er 2885 $m^2$. Keypskostnaðurin verður sostatt kr. 432.750,00.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fleiri fundir hava verið við umboð fyri eigaran av matr. nr. 122h, og umsitingin metir, at hetta er einasta loysn fyri at fáa enda á einum gomlum málið, har kommunan ongantíð gjørdi sína skyldu.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. oktober 2022 | Blað nr.: 920 |
| | | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6175 | Keyp og søla | |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| 432.750,00 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 432.750,00 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til at:

- játta 432.750,00 kr. til keyp av lendi av konto 6175 Keyp og Søla,
- heimila umsitingini at gera keypssáttmála við eigara av matr. nr. 122h
- beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

## 239/22 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri Viðarlundina á Argjum, matr. nr. 4a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2022 | 190/22 | 22/03152-3 |
| 2 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 239/22 | 22/03152-3 |

**Upprunin til málið**
8. november 2021 samtykti Byggi- og býarskipanarnevndin at fara undir at gera viðarlund og trivnaðarøki á Argjum, sí mál *Viðarlund og trivnaðarøkið á Argjum*. Arbeiðið varð boðið út, ein fyritøka fekk arbeiðstøkuna, og arbeiðið er farið í gongd.

**Lýsing av málinum**
Almenna byggisamtyktin fyri økið, har nýggja viðarlundin og trivnaðarøki liggja, er A1, D3 og 4. grundumráði.

A1 øki er ætlað stakhúsum, D3 er ætlað stórum almennum stovnum, og 4. grundumráði er ætlað landbúnaði. Viðarlundir, trivnaðarøki og tílík øki, har man ikki ynskir at byggja, liggja vanliga í D1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Fyri at framtíðartryggja nýggju viðarlundina og trivnaðarøki á Argjum verður mælt til, at økið verður broytt til D1 øki í almennu byggisamtyktini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.

Ásetingar fyri D3 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Umráðispartarnir D3 verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.

Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt.
- Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvari við stk. 1.

Ásetingar fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- 4. grundumráðið verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Viðarlund og trivnaðarøkið á Argjum* – journal nr. 21/04574.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina fyri økið til viðarlund og trivnaðarøki á Argjum til D1 øki smb. kortskjali *Eftir broyting* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

## 240/22 Skeltisreglugerð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2022 | 127/22 | 22/02144-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 30.05.2022 | 45/22 | 22/02144-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 31.05.2022 | 28/22 | 22/02144-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2022 | 175/22 | 22/02144-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 03.10.2022 | 58/22 | 22/02144-1 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.10.2022 | 41/22 | 22/02144-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 05.10.2022 | 206/22 | 22/02144-1 |
| 8 Vinnunevndin | 06.10.2022 | 27/22 | 22/02144-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 224/22 | 22/02144-1 |
| 10 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 205/22 | 22/02144-1 |
| 11 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 240/22 | 22/02144-1 |

**Upprunin til málið**
Fyri vinnurekandi er skelting ein sera týdningarmikil partur av teirra virksemi. Skeltið er fyrsta ávirkanin kundin fær av virkseminum. Skeltið er andlitið úteftir og skal verða sjónligt umframt senda góð signal, soleiðis at tað dregur kundar til. Skelting er tó meiri enn andlitið úteftir hjá virkseminum. Skeltini eru eisini ein eyðsýndur partur av tí samlaðu heildarfatanini av býarmyndini. Tórshavnar kommuna, saman vit teimum vinnurekandi, hava ábyrgd av at laga skeltingina til eina størri heild, t.d. til miðbýin og bústaðarøkini í kommununi, soleiðis at vit kunnu fáa eina kommunu, har trivnaður, kunning, og tey býarskipanarligu virðini kunnu ganga hond í hond.

Fyri at náa hesum málið er ein skeltisreglugerð orðað. Umframt at stuðla marknaðarføringingini hjá vinnuni og samstundis verja heildarfatanini av býarmyndini, skal reglugerðin leiðbeina umsøkjara, umframt skipa og lætta um umsitingararbeiði í Tórshavnar kommunu sí *Skeltisreglugerð kjakupprit 31.08.2022*.

Ein slík skeltisreglugerð er ikki statisk, men kann blívur lagað til, um umstøður í kommununi ella ásetingar í byggisamtyktini verða broyttar.

**Lýsing av málinum**
Skeltisreglugerðin er býtt í fimm partar;

1. Endamál við reglugerðini
   - Í hesum partinum verður innihaldið í skeltisreglugerðini lýst, harumframt mannagongdir og leiðbeiningar.

2. Skeltishættir
   - Í hesum partinum verður skilað ímillum aktiv skeltir og passiv skeltir, ið eru ávikavist elektroniskir skermar og vanlig statisk skeltir úr ymsum tilfari.

3. Endamál við skeltinum
   - Í hesum partinum, verða tey trý skeltissløgini, sum Tórshavnar kommuna loyvir, lýst. Hetta eru; Virkis- og tænastuskeltir, kunningarskeltir og lýsingarskeltir.

4. Meginreglur fyri snið, uppsetan og staðseting
   - Í hesum partinum verða yvirskipaðir tættir innan snið, uppsetan og staðseting av skeltinum lýst umframt ymiskir hættir at skelta uppá, so sum húsaveggskelti, hangandi skelti, tilklistrað vindeygu,

vanlig og størri leys skelti, navnaskelti á bústaðarøki, tíðaravmarkað skelting, talgildir skermar og kunningarskelti.

5. Óbygt øki – 4. Grundumráði
   - Í hesum partinum verður undirstrikað, at skelting í 4. Grundumráði vanliga ikki er loyvd.

Fyri at gera reglugerðina bindandi og fyri at Tórshavnar kommuna skal kunna handhevja innihaldið eru ásetingarnar um skelting rótfestar í almennu byggisamtyktini, ið síðani vísir til sjálva skeltisreglugerðina.

Eitt kort verður knýtt til reglugerðina, soleiðis at umsøkjarin á ein smidligan hátt lætt kann síggja hvørjar ásetingar eru á teimum einstøku økjunum í kommununi sí *Kort við økisásetingum*

Skeltisreglugerðin er galdandi frá tí hon verður samtykt og fram.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/02144-2 Skeltisreglugerð kjakupprit 31.08.2022
22/02144-3 Kort við økisásetingum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til skeltisreglugerðina og beinir málið víðari í teknisku nevnd, náttúru- og umhvørvisnevndina, mentamálanevndina, vinnunevndina, fíggjarnevndina og býráðið til umrøðu og støðutakan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2022:** Útsett.

**Tekniska nevnd 30. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 31. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Sambært *løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir* er einasta bindandi amboðið, kommunur hava, tá tað snýr seg um bygging, herundir eisini skelting, byggisamtyktir.

Fyri at gera skeltisreglugerðina bindandi fyri borgaran er tí neyðugt at knýta hana at byggisamtyktini.

Umráðispartarnir í tí almennu byggisamtyktini eru økir, ið eru ætlað ávísum virksemi, og hava byggireglulerandi ásetingar hesum viðvíkjandi. Almenna byggisamtyktin er býtt upp í 26 ymiskar umráðispartar við ymsum nágreinaðum ásetingum.

Líkasum við ásetingunum um umhvørvisflokking verða ásetingarnar um skelting fyri viðkomandi umráðispartar í byggisamtyktini. Víst verður síðani til skeltisreglugerðina, ið m.a. nágreinar stødd, staðseting og snið av skeltum.

Á henda hátta fáa vit eina bindandi skeltisreglugerð, sum kommunan hevur heimild til at brúka sum eitt virki amboð í mun til skelting í kommununi.

Sí punkt, ið verða sett inn undir hvønn umráðispart í almennu byggisamtyktini niðanfyri:

**§ 2. Ásetingar fyri 1. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | x | |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 3. Ásetingar fyri 2. grundumráði.**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 5. Ásetingar fyri umráðispartarnar A1 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | X, einans “Skelti – virki í egnum bústaði “ |

**§ 6. Ásetingar fyri umráðispartarnar A2 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | ○ X, einans “Skelti – virki í egnum bústaði “ |

**§ 7. Ásetingar fyri A3 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |

| | | | |
| --- | --- | --- | --- |
| Passiv skelting | x | | ○ X, einans "Skelti – virki í egnum bústaði " |

**§ 8. ásetingar fyri umráðispart B1 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
| --- | --- | --- | --- |
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 9. Ásetingar fyri umráðispart B2 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
| --- | --- | --- | --- |
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 10. Ásetingar fyri umráðispart B3 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
| --- | --- | --- | --- |
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 11. Ásetingar fyri umráðispart B4 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
| --- | --- | --- | --- |
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 12. Ásetingar fyri umráðispart B5 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
| --- | --- | --- | --- |
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 13. Ásetingar fyri umráðispart B6 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
| --- | --- | --- | --- |
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 14. Ásetingar fyri umráðispart B7 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
| --- | --- | --- | --- |
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 15. Ásetingar fyri umráðispart B8 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
| --- | --- | --- | --- |
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 16. Ásetingar fyri umráðispart B9 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
| --- | --- | --- | --- |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 17. Ásetingar fyri umráðispartarnar B10 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 18. Ásetingar fyri umráðispartarnar B11 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | x | x | x |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 19. Ásetingar fyri umráðispartarnar C1 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | x | |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 20. Ásetingar fyri umráðispartarnar C1A í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 21. Ásetingar fyri umráðispart C2 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | x | x |

**§ 22. Ásetingar fyri umráðispartin C3 í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x |

**§ 23. Ásetingar fyri umráðispartar D í 3. Grundumráði**
Eingin skelting er loyvd í umráðispartið D1 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu, undantikið almenn skelting/ privat skelting ikki loyvd í D1 umráðispartið.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | |

Loyvd skelting í umráðispartið D2 er aktiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | x | |
| Passiv skelting | x | x | x |

Loyvd skelting í umráðisparti D3 er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|

| | | | |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x |

**§ 24. Ásetingar fyri umráðispartar E í 3. Grundumráði**
Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x |

**§ 25. Ásetingar fyri umráðispartin F í 3. Grundumráði** Loyvd skelting í hesum umráðisparti er passiv skelting sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x |

**§ 26. Ásetingar fyri 4. Grundumráði**
Eingin skelting er loyvd í 4 grundumráði sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu, undantikið almenn skelting/ privat skelting ikki loyvd í D1 umráðispartið.

| | Kunningarskelti | Lýsingarskelti | Virkis- og tænastuskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | (x) |

Tilgongdin tá broytingar verða framdar í almennu byggisamtyktini er henda:
Tá allar nevndir og býráðið hava samtykt skeltisreglugerðina, verður uppskotið um ásetingarnar um skelting í byggisamtyktini lagt til almenna hoyring í 6 vikur. Um ongar viðmerkingar eru frá almenninginum, verður uppskotið til broyting av byggisamtyktini sent til góðkenningar hjá landsmyndugleikanum. Um landsmyndugleikin goðkennir uppskotið, verður skeltisreglugerðin eitt bindandi skjal, heimilað í byggisamtyktini.

Um viðmerkingar eru, skal umsitingin viðgera hesar og leggja málið aftur til politiska støðutakan.

**Tilmæli**
Víst verður til tilmælið frá 30.05.2022.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Tikið av skrá.

**Tekniska nevnd 03. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Bjørg Dam luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Vinnunevndin 06. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

# 241/22 Miðbýarkjarnan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.08.2022 | 157/22 | 22/03571-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 200/22 | 22/03571-1 |
| 3 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 186/22 | 22/03571-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 241/22 | 22/03571-1 |

**Upprunin til málið**
Ein býarkjarna er tað handilsliga, mentunarliga, søguliga og landafrøðiliga hjarta í einum býi. Ein miðbýarkjarna eigur at verða innbjóðandi og at leggja upp til, at fólkið hittist og hevur fyrsta rætt til infrakervið og hentleikar til bústaðir.

Hetta ynskir kommunan at stimbra undir, og hava tríggir ráðgevar fingið møguleika at lata inn tilboð uppá arbeiðið at útvega eitt skipanaruppskot/faldara av miðbýarkjarnuni, sí fylgiskjal *Útbjóðingartilfar* og *Dagført økið*.

Í mong ár hevur miðbýarkjarnan í Tórshavn verið merkt av bilferðslu. Bilurin hevur fyrsta rætt til flestu økini, og parkering fyllir nógv. Harafturat mugu vit ásanna, at vit búgva í einum vetrarbýi, og innrættingin av býnum átti í størri mun at tikið atlit til hetta.

Ein part av árinum hava vit tómar gøtur og eina so at siga lívleysa miðbýarkjarnu, ein sokallaðan “donut-bý”. Orsøkin til hetta er m.a., at keyp á alnótini, hevur gjørt tað gjørligt at fáa sínar vørur flýggjaðar til úthurðina, umframt at kappingin frá handilsmiðstøðum er økt. Okkara býarkjarna hevur tørv á at fóta sær og livna upp aftur.

Ynski er at endurskoða miðbýarkjarnuna í tann mun, at býurin verður tættaður við fleiri bústøðum og trivnaðarligum átøkum, sum fær vitjandi at støðast, samstundis sum at eyðkennið í miðbýnum verður varðveitt og styrkt. Her verður serliga hugsað um at varðveita tær mongu smogurnar, ið binda býin saman, smáu og snøggu býarhúsini við mønutaki, umframt bygningar so sum gamla Føroya Banka, Ebenezer, gamla Sparikassan, Býráðið, Margarinfabrikkina/Tjóðpallin.

Faldarin, sum verður latin kommununi, kemur at liggja til grund fyri framtíðar skipanini av miðbýnum, og verður grundarlagið undir eini komandi serstakari byggisamtykt.

Fyrsta juli móttók kommunan trý tilboð, sum verða lýst niðanfyri, sí fylgiskjøl *Henning Larsen, SNA, BRIM og BRIM-dagførdur prísur*.

**Lýsing av málinum**
Í útbjóðingarskrivinum, varð biðið um tilboð uppá arbeiðið umframt eina frágreiðing av, hvussu uppgávan verður loyst.

| | |
|---|---|
| SNA lat tilboð inn áljóðandi | kr. 800.000 u/mvg |
| Henning Larsen lat tilboð inn áljóðandi | kr. 840.000 u/mvg |
| BRIM lat tilboð inn áljóðandi | kr. 850.850 u/mvg |

SNA hevur lægsta tilboðið. I tilfarinum frá SNA er víst á áhugaverd diagrammir, men eingin fullfíggjað frágreiðing fyriliggur, og tí er ringt at skilja akkurát, hvussu arbeiði verður framt. Serligt fyri hetta tilboðið er, at grønu økini (býarparkin) verða viðgjørd við princippskitsum og plantuplani.

Tilboðið frá Henning Larsen er eitt sindur lægri enn hægsta tilboðið. Tilfarið, sum tey hava latið inn, er sera gott við greiðum tekningum og lýsingum, av hvussu arbeiðið fer fram. Serligt fyri hetta uppskotið er, at alt arbeiðstøkuøkið verður teknað upp í talgildum 3D-forriti. Harumframt verða mikroklimatiskar greiningar gjørdar av býnum við at nýta planleggingarforritið *GreenScenaro*, ið sameinar greiningar og simuleringar av m.a. trivnaði hjá fólki og skugga, sól-, vind- og ljósviðurskifti. Hetta er ein áhugaverdur háttur at arbeiða uppá, sum vit ikki hava roynt fyrr í Tórshavnar kommunu. Hetta gevur kanningarúrslitinum objektivitet og gjøgnumskygni. Umframt hetta verður heitið “Urtagarðsbýurin” nýtt, ið er ein tulking av visiónini úr útbjóðingartilfarinum um eina býarpark. Tey citera Jørgen Franz Jacobsen:

> *Í allar ættir er grønur gróður. Niðan ímillum urtagarðar, klettar og hús sker ein long spákingarleið við nógvum gongufólki. Hálvdoyvt ljóð av samrøðum teirra rennur út í sjóðið av ánni. Øll, sum hava verið í Havn, kenna tað: áin, sum rennur í skugganum av trøunum. Tað er sovorðin eyðkendur blíður dámur um henda gróðurgyrda [býin].*

og vísa á, at tey vilja endurskapa Tórshavn sum ein urtagarðsbý.

BRIM hevur hægsta tilboðið. Tilfarið frá BRIM er væl úr hondum greitt við neyvari frágreiðing um, hvussu arbeiðið fer fram. Serligt fyri hetta uppskotið er, at dentur verður lagdur á at arbeiða við eini neyvari endurtøku av analysum og uppskotum til býarskipan, ein sokallað repitativ process. Hetta merkir, at neyvar kanningar liggja til grundar fyri uppskotunum tey koma við.

Umsitingin hevur mett um innkomnu uppskotini, sí fylgiskjal ‘Meting av tilboðum’. Allir ráðgevarnir hava latið inn nøktandi tilfar, men uppskotið frá Henning Larsen er tað, sum umsitingin metir á bestan hátt líkur ynskini fyri miðbýin og kappingartreytirnar. Umsitingin mælir til, at Henning Larsen fær í boði at gera skipanina av miðbýarkjarnuni. Uppskotið vísir á eina framúr spennandi tilgongd til arbeiðið, umframt at tey útvega eina talgilda upptekning av býnum í 3D, ið er eitt sera virðismikið tilfar í tí víðari menningini av økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu og undirliggjandi serstakar byggisamtyktir.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/03571-5 Útbjóðingartilfar
22/03571-3 Dagført økið
22/03571-3 SNA
22/03571-3 Henning Larsen
22/03571-2 BRIM
22/03571-3 BRIM – dagførdur prísur
22/03571-6 Meting av tilboðum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | x |

| | **Býráðsfundur**<br>27. oktober 2022 | Blað nr.: 932<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | x | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | L62052 | Fríðkan av bygdunum | 6275 | Nýggj | Miðbýar-kjarnan | Ja | 1.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:
- játta 1 mió. kr. til verkætlanina av konto 6275, L62052 Fríðkan av bygdunum
- heimila umsitingini at gera sáttmála við vinnandi ráðgevan
- beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2022:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøddi blankt.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson settu fram broytingaruppskot um at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at 1 mió. kr. verða játtaðar til verkætlanina av LK31011, Útbygging dagstovnurin á Hamrinum.

Broytingaruppskotið varð samtykt við trimum atkvøðum fyri og tveimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg og Annika Olsen, ið mæltu til, at peningurin, ið játtast skal til verkætlanina verður tikin av tøkum peningi heldur enn av konto 6275, L62052, Fríðkan av bygdunum ella av LK31011, Útbygging dagstovnurin á Hamrinum.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá minnilutanum um at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at játtanin verður tikin av tøkum peningi.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Turid Horn, Annika Olsen, Birgir Nielen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, ongari ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Turid Horn og Annika Olsen.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Heðin Mortensen setti fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til at taka undir við málinum við fyrstu viðgerð við teirri broyting, at 1 mió. kr. verður játtað av LK31015, Tillagingar á dagstovnaøkinum, í staðin fyri av LK31011, Útbygging dagstovnurin á Hamrinum.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

Málið soleiðis samtykt við aðru viðgerð.

## 242/22 Fígging til smærri verkætlanir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.04.2021 | 25/21 | 21/01164-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 92/21 | 21/01164-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 126/21 | 21/01164-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 03.10.2022 | 61/22 | 21/01164-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 254/22 | 21/01164-1 |
| 6 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 242/22 | 21/01164-1 |

**Upprunin til málið**
Smærri verkætlanir, sum eru samtyktar í teknisku nevnd

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við hesar smærri verkætlanir, sum ætlast at verða fíggjaðar av 8110, er tørvur á at fáa pening av 8175, íløgur vegir, inn á 8110.

Grundgevingin fyri at fíggja verkætlanirnar á hendan hátt er tann, at verkætlanirnar kunnu byrja beinanvegin og at 8110, í verandi støðu, ikki hevur rúmd fyri nevndu ætlanum.

Verkætlanirnar, ið talan er um, eru:
Mál 21/00463. Parkeringspláss Millum Gilja, kostnaður 1.200.000 kr.
Mál 21/00921. Útbyggjan av parkeringsplássi handan Á, kostnaður 2.500.000 kr.
Mál 21/00297. Vegamótið Flatnavegur / Óluvugøta, kostnaður 1.000.000 kr.
Mál 21/00296. Vegamótið Villingadalsvegur / Norðari Ringvegur, kostnaður 1.000.000 kr.

**Tilsamans 5.700.000 kr.**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**
Talan er um flyting av peningi frá íløgukonto 8175 til rakstrarkonto 8110.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at:
- Tikið verður undir við, at nevndu verkætlanir kunnu byrja
- At flyta kr. 5.700.000 kr. av konto 8175, L00001 Løgukarmur fyri árið, á konto 8110.
- Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Ætlanin er at fáa verkætlanirnar settar í gongd sum skjótast. Tí skulu omanfyri nevndu verkætlanir eftir ætlanin fíggjast sum serstakar nýggjar verkætlanir undir konto 8175, Vegir (íløgur).
Til at gera parkeringsplássið Millum Gilja er komið tilboð inn uppá 1.425 tkr. umframt kommunalt MVG, ella kr. 1.515 tkr. íroknað kommunalt MVG. Kostnaðurin fyri hinar verkætlanirnar byggir á innanhýsis metingar.
Ætlanin er at halda seg innanfyri karmin uppá 5.700 tkr. fyri allar fýra verkætlanirnar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at:
- Umsitingin fær heimild at taka av tilboðnum á tkr. 1.515 íroknað kommunalt MVG til at gera parkeringsplássið Millum Gilja
- At bjóða hini arbeiðini út
- Málið hereftir verður beint í býráðið

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari atkvøðu og ongari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian M. Skála, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti:**
Verkætlanin 'Parkeringspláss millum Gilja' er framd og stuðul er veittur av løgukontuni L81042 til arbeiðið við kappingarøkið hjá Føroyskt íslandsrossafelag. Avlopið á løgukontuni L81042 er pr. september 2022 kr. 3.604.412. Á løgukarminum, LK81042 Fígging til smærri verkætlanir, er støðan harumframt í løtuni eitt hall á kr. 414.000. Sostatt eru netto kr. 3.190.412 tøkar á L81042 til írestandi arbeiðir

Seinastu tíðina eru kostnaðirnir fyri anleggsarbeiðir hækkaðir munandi, og verður tað mett, at tøki peningurin á løgukontuni ikki røkkur til allars verkætlanirnar, sum upprunaliga ætlað.

Mett verður at upprunaligu málini: Mál 21/00297. Vegamótið Flatnavegur / Óluvugøta og mál 21/00296. Vegamótið Villingadalsvegur/Norðari Ringvegur kunnu gerast innanfyri ein kostnað svarandi til tøka peningin á løgukontuni.

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | L81042 | Fígging til smærri vegaverkætlanir | 8175 | LK81042 | Fígging til smærri vegaverkætlanir | | 414.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 414.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022/2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at:

- Sakin 'SL81042B Parkeringsøki undir Heygnum' verður annulerað og peningurin, sum var disponeraður til hesa sak, kr. 2.400.000, verður býttur soleiðis:
  - Kr. 414.000,- aftur á løgukarmin LK81042 Fígging til smærri verkætlanir
  - Avlop á kr. 3.190.412 verður býtt sundur á sakirnar SL81042C og SL81042D til liðuggerð av hesum sakum.
- Heimilað verður umsitingini at bjóða verkætlanirnar 'Vegamótið Flatnavegur/Óluvugøta' og 'Vegamótið Villingadalsvegur/Norðari Ringvegur' út og seta arbeiðini í verk, treytað av at kostnaðurin er innan fyri tøku upphæddina á løgukonto L81042 Fígging til smærri verkætlanir.

**Tekniska nevnd 03. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Teknsiku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

## 243/22 Eykajáttan til nýggja maskinu til vegamerking

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2022 | 57/22 | 22/04630-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 226/22 | 22/04630-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 208/22 | 22/04630-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 243/22 | 22/04630-1 |

**Upprunin til málið**
Ferðsluliðið undir rakstrarstovninum hevur ábyrgdina av, at vegirnir í Tórshavnar kommunu verða merktir, tá merkingin er slitin, ella tá vegastrekkir eru umvæld ella asfalterað.

Hetta krevur, at útbúnaður er tøkur og virkandi, tá veður og arbeiðsumstøður annars loyva, at arbeiðið verður framt.

Tørvur er á at fáa til vega eina nýggja maskinu til vegamerking til arbeiðið í 2023 og frameftir fyri at tryggja, at henda funktiónin í virkseminum hjá rakstrarstovninum kann verða framd á ein støðugan og optimalan hátt.

**Lýsing av málinum**
Arbeiðið at merkja vegirnar er sera nógv tengt at veðrinum. Tað skal vera tátt, tá vegirnir verða merktir. Eisini er best, um hetta arbeiðið verður framt, tá ferðslan er minst, og verður tí oftast arbeitt um náttina.

Tí er summarið háárstíð fyri merking av vegunum. Tá eru vegirnir oftast táir, og næturnar eru ljósar.

Tað eru í høvuðsheitum tveir ymiskir hættir at merkja vegirnar: vanlig vegamáling og termoplast. Tórshavnar kommuna hevur útgerð til báðar hættir. Vanliga vegamálingin er ikki eins slitsterk og termoplast, men bíligari í tilfari. Hon verður ofta brúkt til parkeringsbásar og annars á økjum, har slitið ikki er stórt. Termoplast er dýrari í tilfari, men heldur nógv betri enn vanlig vegamáling, harafturat hevur termoplastið eisini eitt relief í mun til farbreytina, og tí kann henda merkingin eisini merkjast, tá koyrt verður yvir hana. Hetta hevur týdning, tá talan er um miðstrípur, hávatenn, gonguteigar o.l.

Í 2022 hevur veðrið verið svikaligt, og tí hava umstøðurnar ikki verið optimalar fyri merking av vegunum. Harafturat hevur maskinan til merking við termoplasti verið í ólagi. Tað hevur ikki verið gjørligt hjá verkstaðnum, at umvæla maskinuna, tí er hon blivin send til Danmarkar til umvælingar. Hetta hevur viðført, at ferðsluliðið ikki hevur verið ført fyri at merkja teir vegir, sum ætlanin var at merkja, og tí er merkingin av vegunum við termoplasti komin langt afturút í mun til ætlan og eisini í mun til umvælingar og asfalteringsarbeiðir, sum annars eru gjørd. Hetta hevur neiliga ávirkan á trygdina á hesum vegum.

Tað hevur ikki verið møguligt, at leiga tilsvarandi maskinu í umvælingartíðini.

Mett verður, at um ferðsluliðið hevur tvær maskinur til vegamerking við termoplasti, so kann tryggjast, at tað altíð er ein maskina tøk, um umvælingar eru neyðugar á hini maskinuni.

Leiðarin av verkstaðnum upplýsir, at ein nýggj maskina til vegamerking við termoplasti kostar uml. kr. 1.600.000,-. Tá er íroknað frakt, mvg og allar útreiðslur í sambandi við upplæring av førarum í at brúka maskinuna rætt. Tað er long veitingartíð til slíkar sermaskinur, og tí er neyðugt, at maskinan verður bíløgd frá veitara í heyst (2022), fyri at hon skal verða tøk á vári 2023.

Talan er um eina Borum Master2700 maskina til vegamerking við standard útgerð.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| 1.600.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.600.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla teknisku nevnd til at umrøða møguliga játtan, kr. 1.600.000, av eykajáttan á konto 8375, Rakstrargøgn (íløgur), til innkeyp av nýggjari maskinu til vegamerking og beina málið víðari umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Tekniska nevnd 12. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á fíggjarnevndina um at ávísa fígging.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og fíggja av kontu LK71007 Brennistøðin, skiljuhøll.

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 244/22 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 37/21 | 21/02196-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 160/21 | 21/02196-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 188/21 | 21/02196-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.11.2021 | 70/21 | 21/02196-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 297/21 | 21/02196-2 |
| 6 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 302/21 | 21/02196-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 26.04.2022 | 37/22 | 21/02196-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 27.04.2022 | 120/22 | 21/02196-2 |
| 9 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 99/22 | 21/02196-2 |
| 10 Fíggjarnevndin | 12.05.2022 | 123/22 | 21/02196-2 |
| 11 Býráðsfundur | 12.05.2022 | 104/22 | 21/02196-2 |
| 12 Tekniska nevnd | 03.10.2022 | 60/22 | 21/02196-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 253/22 | 21/02196-2 |
| 14 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 244/22 | 21/02196-2 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við at samráðingar hava verið millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um at kommunan tekur á seg at gera nýggjan uttara ringveg við íbindingum til Tórshavn er gjørd avtala millum partarnar um, at Føroya landsstýri letur Tórshavnar kommunu stuðul til part av verkætlanini.

**Lýsing av málinum**
Nýggjur uttari ringvegur í Tórshavn hevur verið í umbúna í mong ár og serliga síðani farið var undir at fyrireika Eysturoyartunnilin.

Landsverk hevur arbeitt við at fyrireika henda veg, og í hesi fyrireiking er linjuføring fyri vegin løgd og knútapunkt á linjuføringini staðsett (sí kort í fylgiskjølum). Vegurin verður gjørdur millum rundkoyring oman fyri Sandvíkarhjalla (C) og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð (G). Á hesum strekkinum verða knútapunktini C1, C2 og C3, sum eru íbindingar til millum knútapunkt C og knútapunkt E, sum er rundkoyring við Villingadalsvegin/Sundsvegin. Úr knútapunkti E verður tunnil til knútapunkt F, sum er vestan fyri Hotel Føroyar. Í knútapunkti F verður gjørd rundkoyring, sum hevur fýra greinar: Ein í tunnilin, ein oman í knútapunkt G og tvær til Landið at føra ferðsluna til ávikavist Oyggjarvegin og til Sandoyarleiðina.

Alt vegastrekkið millum punkt B og G verður kommunalur vegur.

Samlaði kostnaðurin er mettur til at vera 288 mió. kr.

Stuðulin frá landinum verður í mesta lagið 110 mió. kr., sum ásett er í løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn. Stuðulin verður veittur yvir 5 ár.

Stuðulin er treytaður av, at

- arbeiðið við nýggja uttara ringvegnum verður framt í sama mun, sum stuðul verður goldin út.
- Nýggi uttari ringvegur skal lúka krøv til ferðslutrygd og vera atkomuligur fyri ferðslu til og frá meginøkinum. Hetta er tó ikki galdandi í tíðarskeiðum, tá vegarbeiði og tílíkt verður gjørt.
- Alt vegastrekkið skal haldast frítt fyri forðingar, sum t.d. ferðslubungur, soleiðis at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Nýggjar íbindingar í nýggja uttara ringveg kunnu bert gerast til vegir, sum eru ætlaðir til bilferðslu; ikki til atkomu til bygningar og tílíkt. Er neyðugt at gera nýggja íbinding til annað enn ein veg, sum bara er ætlaður bilferðslu, skulu hesar fyriskipast soleiðis, at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Útgoldin stuðul kann verða kravdur afturgoldin, um treytirnar ikki verða hildnar. Útgoldin stuðul kann tó ikki verða kravdur afturgoldin, tá løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn er farin úr gildi.
- Fíggjarmálaráðið kann tinglýsa hesa avtalu á matrikulin, tá nýggi uttari ringvegurin er liðugur.

Avtalan er víðari treytað av, at Løgtingið samtykkir uppskotið til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn, og at Tórshavnar Býráð samtykkir og fremur verkætlanina sambært ásetingum í løgtingslógini og sambært avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um Fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.

Umsitingin kannar alt tøkt verklagstilfar, forkanningar og alt annað tilfar, sum Landsverk hevur framleitt í sambandi við hesa verkætlan, og sum uttan viðurlag verður latið Tórshavnar kommunu sambært avtaluni.

Byggiskrá verður gjørd við støði í úrslitinum av hesum kanningum, og arbeiðið at fremja verkætlanina verður boðið út av umsitingini sum heildarverkætlan, antin fyri:

- Alla verkætlanina samlað,
- ella fyri vegir og tunnil hvør sær.

Umsitingin arbeiðir í hesum sambandi eisini við at finna fíggingarleist fyri kommununnar part av verkætlanini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Innkomuvegur yvirlit, j.nr. 21/02196-4
Avtala_FMR_TK, j.nr. 21/02196-1
LI_uttararingveg, j.nr. 21/02196-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | Byráðsfundur<br>27. oktober 2022 | Blað nr.: 942<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

## Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti

Biðið verður um 1 mió. kr. til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyri standandi fyrireikingar.

| | **Rakstrarjáttan** | **Løgujáttan** |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato: juni-des 21 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | **Á** | | | **Av** | | | **Lokað** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk 1.000.000 | 8175 | L81037 | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við:

- avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.
- at umsitingin fær heimild til at gera byggiskrá fyri heildararbeiðstøku.
- at umsitingin fær heimild til at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku fyri:
  - Alla verkætlanina samlað,
  - ella fyri vegir og tunnil hvør sær.
- Umsitingin fær játtað ein fíggjarkarm á kr. 1.000.000,- av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, L81037, Innkomuvegur kommunali partur, til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyristandandi fyrireikingar.
- Málið soleiðis verður samtykt og beint víðari í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt við teirri broyting, at partar av vegnum/tunnilin kann bjóðast út í innbodnari licitatión.

**Ískoyti:**

Í sambandi við at projektering av tunli og vegum skal gerast, er tørvur á at umsetingini verður heimilað at gera hesar sáttmálar. Í hesum sambandi er tørvur á einum samlaðum karmi á kr. 3.500.000. Hesin karmur er treyt fyri, at projekteringin av innkomuvegnum og tunli kunnu fremjast og gerast liðug. Skotið verður upp, at afturat teimum kr. 1.000.000 og kr. 751.000, sum áður eru játtaðar og framfluttar frá 2020 til verkætlanina L81037 Innkomuvegur kommunalur partur, verða játtaðar kr. 1.750.000, sum ikki verða avgreiddar av ymiskum øðrum kontum og verkætlanum í 2021:

- 500 tkr av løgukarmi LK81042, Vegaverkætlanir,
- 500 tkr av løgukarmi LK81043, Parkeringstunnil,
- 500 tkr av Løgujáttan L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan
- 250 tkr av Løgujáttan L81043, Dagføring Norðrari Ringvegur við Norðurlandahúsið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við at:

- Umsitingini verður heimilað at gera sáttmálar um projektering av innkomuvegi og tilhoyrandi tunli innan ein samlaðan karm á kr. 3.500.000
- Karmurin til projektering verður fíggjaður av:
    - Verandi tøkari upphædd á L81037 Innkomuvegur kommunalur partur
    - 500 tkr av løgukarmi LK81042, Vegaverkætlanir,
    - 500 tkr av løgukarmi LK81043, Parkeringstunnil,
    - 500 tkr av Løgujáttan L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan
      250 tkr av Løgujáttan L81043, Dagføring Norðrari Ringvegur við Norðurlandahúsið.

**Tekniska nevnd 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at arbeiðið verður fíggjað av íløguætlan fyri 2022 (Innkomuvegur).

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við teknisku nevnd.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Turið Horn, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg

**Ískoyti**:
Fyrsti partur av uttara ringvegi, ið er arbeiðsvegur frá á Hjalla til Villingadagsvegin, varð boðin út og lægsta boð à kr. 17.272.128 uttan MVG, hevði Articon.
Fyri at seta arbeiðið í gongd, verður biðið um fylgjandi játtan:

| | |
|---|---:|
| • Tilboð | 17.272.128 |
| • Verkætlanarleiðsla, eftirlit og byggileiðsla | 1.000.000 |
| • Avleiddar verkætlanir | 5.600.000 |
| • 6,25 MVG | 1.492.008 |
| | |
| Tilsaman | 25.364.136 |

**Tilmæli**:

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður av lægsta tilboðnum frá Articon, at játtaðar verða kr. 25.364.136 til verkætlanina, fyrsti partur av uttara ringvegi, kr. 4.600.000 av LK81037 og kr. 20.764.136 sum eykajáttan og beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 26. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting, at kr. 20.764.136,00 verða játtaðar av mettum meirinntøkum í 2022. Um metingarnar ikki halda, verður fíggingin løgd fyri aftur, møguliga sum lántøka. Málið beint í býráðið sum eykajáttan hvat viðvíkur upphæddini á kr. 20.764.136,00.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Ískoyti:** Fyri at tryggja so stuttan flutning av grevstrartilfarinum sum gjørligt, er gjørt uppskot um avtalu við festaran á Hoyvíkshaganum Norðaripartur um at taka ímóti avlopstilfari, sum ikki verður brúkt í verkætlanini. Fyri hetta skal festarin fáa somu upphædd fyri rúmmeturin, sum annars verður kravdur í tyrvingarplássinum í Húsahaga.

Samlað er talan um ein kostnað á uml. kr. 2.150.000,00, sum ikki er íroknaður í útboðnum og givna tilboðnum ísv. verkætlanina.

Harumframt hevur verkætlanin varandi neiliga ávirkan á raksturin av festinum, tá lendið, sum festið hevur ræði á, verður lagt undir vegin og avleiddar verkætlanir umframt komandi vinnuútstykkingina í økinum. Festarin missir tá bit til seyð, undirlendi til ungneyt umframt fría atkomu til bitið. Harumframt verða skipanirnar av verandi fylgjum og gongum ávirkaðar við eyka avbjóðingum til festaran sum avleiðing. Umsitingin metir og er samd við festaran, at ein eingangssamsýning til festaran á kr. 1.500.000,00 er hóskandi samsýning fyri hesar neiligu ávirkanir á raksturin av festinum.

Avtalurnar við festaran hava við sær, at neyðugt er at hækka játtanina, ið samtykkjast skal við aðru viðgerð, úr kr. 20.764.136,00 upp í kr. 24.424.136,00.

**Tilmæli:** Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at samtykkja uppskotið við aðru viðgerð við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 24.424.136,00 av meirinntøkum í 2022 og annars taka undir við fyriliggjandi avtalum við festaran.

**Fíggjarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. mai 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevi kommununar hevur eftir avtalu við kommununa projekterað tunnilin lidnan til høvuðsarbeiðstøku og vegurin frá rundkoyringini við Hvítanesvegin til tunnlismunnan undir Brúnni er projekteraður soleiðis, at geometri og krøv eru gjørd klár til heildararbeiðstøku – her er talan um ein lidnan projekteraðan ráveg, tað vil siga at vegkassin er liðugt projekteraður, meðan yvirbygnaður, leiðingar, avvanding, ljós búgvar o.s.fr. ikki eru liðugprojekterað, men krøvini fyri projektering av teimum eru sett upp.

Neyðugt er, at arbeiðstøkurnar fyri tunnil og veg fylgjast, soleiðis at tilfar úr tunlinum í mestan mun kann verða flutt beinleiðis úr tunlinum til vegin. Eisini verður mett, at tað er ein avgerandi fyrimunur fyri logistikkin í samlaðu verkætlanini um einans ein arbeiðstakari er fyri bæði tunnil og veg. Hetta krevur, at útboð og lisitatión fyri tunnil og veg eru samtundis.

Tunnilsgerðin inniber nógv arbeiði í sambandi við vatntrygging og bergtrygging, sum hóast tunnil hevði verið heildararbeiðstøka, helst høvdu verið avroknað øðrvísi. Tí verður mælt til, at tunnilin verður boðin út sum høvuðsarbeiðstøka. Vegurin, hinvegin, er betri egnaður at bjóða út sum heildararbeiðstøka, men vil

hesin útboðsformurin krevja longri tíð, áðrenn lisitatión kann haldast fyri hesa arbeiðstøkuna. Hesi viðurskifti gera, at mett verður at besti útboðsháttur fyri samlaðu verkætlanina er, at tunnil og rávegur verða boðin út fyrst, sum høvuðsarbeiðstøka, meðan vegurin verður liðugt projekteraður til útboð til høvuðsarbeiðstøku.

Mett verður at hetta projekteringsarbeiðið saman við neyðugum kanningum verður gjørt innan ein karm á kr. 1.500.000,-. Undir hesum eru eisini neyðugar støðukanningar av verandi brúgvum, sum framhaldandi verða partur av uttara ringvegi, og projektering av broytingum av hesum brúgvunum. Hetta arbeiðið verður mett at kostað um kr. 350.000,-.

Arbeiðið verður mett at verða liðugt og klárt at bjóða út um ársenda 2022. Tó eigur at verða sett tann treyt, at farast kann ikki undir projekteringina av lidnum vegi, áðrenn Tórshavnar býráð hevur samtykt at fara undir tunnil og veg, sum lýst omanfyri.

Tó eigur at kunna farast undir at gera støðukanningar av brúgvunum beinanvegin og projektera broytingar av teimum í mun til lidnan veg.

## Játtan:

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 8175 | LK81037 | Innkomuvegur |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 8175 | 81037 | Innkomuvegur | |

| **Upphædd** |
|---|
| 1.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022/2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

## Tilmæli:

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til, at samtykt verður at heimila umsitingini at:

1. Bjóða ráveg og tunnil út sum høvuðsarbeiðstøku
2. Gera sáttmála við ráðgevan um detailprojektering av vegaverkætlan frá rundkoyringini við Hvítanes til Tunnilsmunnan undir Brúnni innan eina rammujáttan á kr. 1.500.000,-, treytað av at Tórshavnar býráð samtykkir at taka av tilboði um ráveg og høvuðsarbeiðstøku. Tó eru støðumeting og projektering av broytingum av verandi brúgvum undantikin hesi treyt innan eina kostnaðarrammu upp til kr. 350.000,-
3. at peningurin verður játtaður av konto 8175 Vegir (íløgur), L81037 Innkomuvegur

**Tekniska nevnd 03. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

## 245/22 Dagføring av Jøkulstræti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.03.2019 | 17/19 | 19/00853-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 19/20 | 19/00853-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 02.05.2022 | 41/22 | 19/00853-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 131/22 | 19/00853-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 124/22 | 19/00853-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 03.10.2022 | 68/22 | 19/00853-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 257/22 | 19/00853-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 245/22 | 19/00853-1 |

**Upprunin til málið:**
Nú Landavegurin er dagførdur, so treingir síðugøtan Jøkulstræti til at dagførast. Eisini er stórur tørvur á p-plássum í økinum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til dagføring av Jøkulstræti. Uppskotið umfatar strípað gongubreyt í niðara borð á 1,5 m, eina vegaføring á 2*2,75 m, p-pláss vinkulrætt á vegalinjuna framvið matr. nr. 910ap og 910æ, Tórshavn, og eina gongubreyt á 1,5 m í ovara borð. Síðst nevnda gongubreyt er ætlað til sjónveik, sum ferðast til og frá Føroya Blindastovn.

Ætlanin er eisini at taka hond um kloakkføringarnar í økinum, soleiðis at regnvatn verður tikið burtur úr skittvatnskloakkini. Sum nú er, fer regnvatn í skittvatnskloakkina. Eisini er økið sera vátt oman fyri Jøkulstræti. Her er ætlanin at leggja ein drenleiðing framvið í ovara borð.

Verkætlanin verður prosjekterað innanhýsis, og tilfarsveitingar verður byggiharraveiting fyri at gera verkætlanina bíligari.

Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ferðslulógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Staðseting av stórari mastur hjá FT-Net.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ætlanin er at leggja uppskotið til loysn fyri ferðslunevndina.
Byggi- og umhvørvisdeildin og býarskipanardeildin verða kunnaðar um verkætlanina.

**Skjøl**

| | |
|---|---|
| Plantekningar | Plantekning nr. 1<br>Plantekning nr. 1A |
| Fíggjarskjøl | Kostnaðarmeting_HVÚ<br>Kostnaðarætlan C |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

Um roknað verður við einum meturkostnaði á 5.500,- kr./m, so verður kostnaðurin fyri handverkaraútreiðslur umleið kr. 570.000,- u/mvg fyri umleið 103 m av vegi.
Samlaði kostnaðurin íroknað projektering og eftirlit og 6,25% mvg verður uml. kr. 1,0 mió.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at dagføra Jøkulstræti og samstundis at gera minst 27 nýggj parkeringspláss á økinum, at innheinta 2 undirhondsboð uppá arbeiðið og at játta kr. 1,0 mió. til arbeiðið av íløgukarminum fyri vegir og parkering, konto.nr. 8175, løgunummar L00001.

**Tekniska nevnd 12. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Ráðgevi hevur m.a. í samráð við grannalagið, vegna kommununa tillagað prosjekt at dagføra Jøkulstræti og sett arbeiðið at gera vegin í útboð.

Tilboð verða tøk 5. mars 2020, at leggja fyri nevnd á fyrstkomandi nevndarfundi.

**Tilmæli:**
Tilmæli um tilboð og fígging v.m verða tøk á fundinum.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Lisitatión um vegarbeiði at dagføra Jøkulstræti og útvega fleiri p-pláss varð hildin 05.03.2020.

Sp/f Ráð hevur staðið fyri útbjóðingini. Tríggir arbeiðstakarar vóru bodnir at geva tilboð og allir lótu tilboð inn.

Innkomnu tilboðini vóru hesi.

1) Tilboð frá Tórhalli Hansen uppá kr. 2.399.200,- uttan mvg
2) Tilboð frá RTS Contractors uppá kr. 2.893.372,- uttan mvg
3) Tilboð frá KONSAX uppá kr. 2.625.977,- uttan mvg

**Ískoyti:**
Samlaði kostnaðurin er væl oman fyri metingina frá mars 2019. Arbeiðið varð ikki mett átrokandi tá, og peningur varð ikki tøkur tá.

Nú sethús eru bygd við niðara borð á Jøkulstræti, verður boðað frá avvatnings trupulleikum, ið einast kunnu loysast við at dagføra vegin.
Arbeiðið kann tillagast og bjóðast út av níggjum.
Ein tillaging er gjørd av umsitingini, og er metingin 1,9 mió. v. 6,25% mvg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:
- Samráðast við Tórhall Hansen, ið átti lægsta boðið, um eina tillagaða loysn, mett til 1,9 mió. v. mvg.
- Játta 815.000 kr. av 6875, L00002 framfluttur løgukarmur ógreinað, 639.000 kr. av 6875, L00001 Løgukarmur fyri árið, og 546.000 kr. av 6875, LK 68999, Kloakkir.
- Beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 02. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at umsitingin útinnir tær tillagingar, sum nevndin ynskir.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ein tillagað loysn er gjørd, og hevur Tórhallur Hansen givið eitt tilboð uppá hesa, ið er 2.313.300 kr. v. 6,25% mvg.

Tilboðið er væl hægri enn mett varð, og grundgevingin fyri hesum er, at kostnaðarstøðið er hækkað sera nógv síðan metingin varð gjørd, hetta orsakað av støðuni úti í heimi.
Tilboðið er kannað, og eru einleika prísirnir hækkaðir millum 5 og 11%, og er hetta mett at vera í lagi, vísandi til kostnaðarstøði í dag.

Eykakostnaðurin er mettur til 500.000 kr. Tá er óvæntað eisini íroknað.

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | L68041 | Dagføring av kloakk í Jøkulstræti | | 500.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 500.000 kr. av 6875 LK68999 til verkætlanina dagføring av kloakk í Jøkulstræti, 6875 L68041 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 03. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

# 246/22 Dagføring av rottangum á matr. nr. 1au, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 03.10.2022 | 67/22 | 22/01107-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 255/22 | 22/01107-2 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 246/22 | 22/01107-2 |

**Upprunin til málið**
Í samband við projekteringsarbeiðið viðvíkjandi kloakkering av nýggja sambýlinum á Mýrini í Hoyvík er komið fram, at verandi kommunal reinsiverk, sum taka ímóti stórum parti av kloakkeringini frá útstykkingunum í Hoyvíkshaga eru gomul (um 60 ár) og ikki longur í hóskandi støðd ella standi til at taka ímóti øllum kloakktilfarinum úr upplandinum. Harumframt er tekin um at tangarnir leka og væta seyrar úr teimum undir vegkassan og oman gjøgnum Kúrdal í farleiðini av kloakkleiðingunum.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin er at seta nýggj reinsiverk niður niðan fyri Hvítanesvegin millum Hvítanesvegin og Kúrdalsveg. Ætlanin er at seta tríggjar tangar niður, sum koma í staðin fyri gomlu tangarnar á Mýrini, sum umframt at vera í ringum standi og ótíðarhóskandi eisini liggja inni á anramans matrikli. Tann eini av hesum tangunum er ætlaður at kunna virka sum depottangi fyri renovatiónina. Hetta verður gjørt fyri at sleppast skal undan at koyrast skal til Kvívíkar at tøma bilin á hvørjum sinni. Í staðin verður møguligt, at bilarnir verða tømdir í henda millumtangan og síðani verður samlað úr hesum tanganum og koyrt til Kvívíkar.

Umsitingin hevur heintað inn tilboð at gera hetta arbeiðið og innkeyp av tangum og tilhoyri. Eisini eru gjørdar metingar av, hvør kostnaðurin verður fyri byggileiðslu, eftirlit, ráðgeving og avleidd arbeiðir.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| | **Býráðsfundur**<br>27. oktober 2022 | Blað nr.: 951 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6875 | | Nýggj reinsiverk á Mýrini | ja |

| **Upphædd** |
|---|
| 2.800.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 2.800.00 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022/2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður av tilboðnum frá arbeiðstakaranum og játtaðar verða kr. 2.800.000 av konto 6875 Kloakkir (íløgur), Løgukarmur LK68999 Kloakkir á nýggja verkætlan undir konto 6875 Kloakkir (íløgur við heitinum 'Nýggj reinsiverk á Mýrini' til hesi endamál:

1. Fremjan av arbeiðinum samsvarandi við sáttmála
2. Innkeyp av samlitangum og tilhoyri
3. Byggileiðslu, eftirlit og ráðgeving
4. Avleidd arbeiðir

**Tekniska nevnd 03. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á fyrisitingina um at gera arbeiðið, so tað órógvar ferðsluna sum minst.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

# 247/22 Áheitan um fund um parkeringsviðurskiftini við Nazaret í Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 03.10.2022 | 62/22 | 22/04229-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 256/22 | 22/04229-3 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 247/22 | 22/04229-3 |

**Upprunin til málið**
Áheitan frá samkomuni um fund við TK um parkeringsplássið hjá teimum.

**Lýsing av málinum**
Umboð fyri samkomuna Nazaret í Kaldbak var á fundi hjá TK og greiddi frá parkeringsviðurskiftunum á teirra parkeringsplássi.

Millum annað varð víst á, at parkeringsplássið verður brúkt í stóran mun til almenna parkering, og eisini nógv brúkt í sambandi við skúlan. Skúlin hevur onki parkeringspláss.

Teir greiddu frá, at parkeringsplássið nú var so nógv slitið, at asfaltering er neyðug.

Økið er 350 $m^2$, og er ein asfaltering mett at kosta 160.000 kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8175 | L81036 | HAG | 8175 | | Asfaltering av p-øki hjá Nazaret | Ja | | 160.000,- kr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 160.000,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0,- |

**Tilmæli:**
Vísandi til at økið í stóran mun verður brúkt sum alment parkeringspláss, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at stuðla asfalteringini við 160.000 kr., treytað av at ein brúksavtala við samkomuna, ið varðar minst 20 ár, verður gjørd.

Hetta kann fíggjast soleiðis:
- At játtaðar verða kr. 160.000 av konto 8175, Vegagerðir, L81036, Liðuggerð av Hans Andriasar gøtu, á konto 8175, nýggj verkætlan “Asfaltering av parkeringsøki hjá samkomuni Nazaret.
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 03. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

# 248/22 Skjótløðistøð til kommunal akfør

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.10.2022 | 43/22 | 22/04583-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 258/22 | 22/04583-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 248/22 | 22/04583-1 |

**Upprunin til málið**
Kommunala verkstaðið hevur víst á tørvin á eina skjótløðistøð til kommunal akfør og maskinamboð og hevur í tí sambandi spurt, um hetta kann fíggjast av fíggjarkarminum á konto 6177, Orkupolitikkur. Ein partur av orkupolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu er at skifta akfør hjá kommununi til grøna orku. Í løtuni merkir hetta el-rikin akfør.

**Lýsing av málinum**
Alsamt fleiri kommunal akfør eru el-rikin og allir vanligir bilar verða skiftir til el-bilar, so hvørt teir skulu endurnýggjast.

So hvørt størri akfør og maskinamboð skulu endurnýggjast, verður mett um, hvørt nøktandi el-rikin alternativ eru tøk. Møguleikar til at løða og løðitíðir eru partur av slíkari meting. Í tí sambandi er og verður alsamt størri tørvur á skjótløðistøðum.

Skjótløðistøðir krevja sera nógva effekt, sum setir stór krøv til el-netið. Í onkrum førum kann staðfestast, at við kommunalar rakstrarstovnar nøktar verandi el-net ikki tørvin á vanligum løðistøðum, tíansheldur hjá skjótløðistøðum. Tí er í løtuni avmarkað, hvar skjótløðistøðir kunnu uppsetast.

Á Hjalla er el-netið nóg sterkt til skjótløðistøðir. Fyrisitingin metir, at tað er skynsamt at seta fyrstu skjótløðistøðina upp við kommunala verkstaðið á Hjalla. Har fer eftir tørvi at bera til at løða kommunal akfør og maskinamboð, umframt í sambandi við eftirlit, viðlíkahald og umvæling.

Væntaði samlaði kostnaðurin av einari skjótløðistøð er kr. 150.000.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fíggjarkarmurin fyri 2022 á konto 6177, orkupolitikkur, er 8 mió. kr. Harumframt er ein minni restupphædd frá 2021 á umleið kr. 370.000, ið er disponerað til at skifta gøtuljós til LED.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Av fíggingini á 8. mió. kr. fyri 2022 er fylgjandi játtað:
Kommunalir bygningar bindast í fjarhitanetið, kr. 4,5 mió.
Verkætlan um at gagnnýta heita vatnið í Kollafirði, kr. 1 mió.
Hitaætlan fyri Tórshavnar kommunu, kr. 1,5 mió.
Harumframt verður arbeitt við eini verkætlan um at nýta sjóvarhita til Lágargarð o.a. Treytað av endaligari játtan og at arbeiðið kann setast í gongd í 2022 kann væntast, at í minsta lagi 0,5 mió. kr. verða brúktar til hetta í 2022.
Eftir eru sostatt kr. 0,5 mió. kr. til onnur orkuendamál, íroknað skiftið til LED og el-rikin akfør.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | X | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 2177 | Nýggj | Skjótløðistøðir | Ja | 150.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 150.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022/2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á teknisku deild mæla til at:
- Tórshavnar kommuna setir eina skjótløðistøð upp til el-rikin akfør og maskinamboð staðsett á kommunala verkstaðnum á Hjalla,
- kostnaðurin á kr. 150.000 verður fluttur av fíggjarkarminum á konto 6177, orkupolitikkur, á eina nýggja løgujáttan til skjótløðistøðir,
- beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

# 249/22 Fíggjarætlan 2023, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.09.2022 | 245/22 | 22/04851-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 216/22 | 22/04851-1 |
| 3 Heilsu- og eldranevndin | 04.10.2022 | 16/22 | 22/04851-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 05.10.2022 | 198/22 | 22/04851-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 06.10.2022 | 63/22 | 22/04851-1 |
| 6 Vinnunevndin | 06.10.2022 | 28/22 | 22/04851-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.10.2022 | 40/22 | 22/04851-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.10.2022 | 191/22 | 22/04851-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 17.10.2022 | 69/22 | 22/04851-1 |
| 10 Havnanevndin | 17.10.2022 | 28/22 | 22/04851-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 267/22 | 22/04851-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | | | 22/04851-1 |
| 13 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 249/22 | 22/04851-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Býráðið hevur fyrstu viðgerð 27. oktober og aðru viðgerð 24. november.

**Lýsing av málinum**

**Fortreytir fyri fíggjarætlan 2023**
Í uppskotinum til fíggjarætlan 2023 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 19,00% og 8.000 kr.

Kendar framskrivingar og virksemisbroytingar eru tiknar við.

Virksemisbroytingar eru til dømis sáttmála- og lógarbundnar broytingar, ávirkan á rakstrarkostnaðir av nýggjum íløgur og íløgum, ið koma ístaðin fyri aðrar umframt samtyktar og ætlaðar broytingar í virksemi og tænastustøði.

Í talvuni niðanfyri síggjast høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| | | Roknskapur 2021 | Ætlan 2022 | Ætlan 2023 | Broyting 2022/2023 pst | kr |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | tkr | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 900.238 | 920.000 | 957.000 | 4,0% | *37.000* |
| 20601 | Felagsskattur | 63.667 | 35.000 | 30.000 | -14,3% | *-5.000* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 534 | 2.000 | 1.000 | -50,0% | *-1.000* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 167.889 | 169.386 | 185.000 | 9,2% | *15.614* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 36.074 | 35.659 | 35.659 | 0,0% | *0* |
| | **Inntøkur íalt** | **1.168.402** | **1.162.045** | **1.208.659** | **4,0%** | ***46.614*** |
| | | | | | | |
| **Rakstrarútreiðslur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 93.348 | 96.888 | 101.323 | 4,6% | *4.435* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 285.546 | 300.872 | 313.195 | 4,1% | *12.323* |
| §3 | Børn og ung | 203.387 | 217.381 | 225.072 | 3,5% | *7.691* |
| §4 | Undirvísing | 50.001 | 47.159 | 51.843 | 9,9% | *4.684* |
| §5 | Mentan og frítíð | 71.286 | 62.956 | 64.635 | 2,7% | *1.679* |
| §6 | Teknisk mál | 156.650 | 147.142 | 152.107 | 3,4% | *4.965* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 76.319 | 77.039 | 85.700 | 11,2% | *8.661* |
| §7 | Kommunal virkir TH | -41.702 | -32.353 | -40.070 | -23,9% | *-7.717* |
| | **Rakstur íalt** | **894.835** | **917.084** | **953.806** | **4,0%** | ***36.722*** |
| | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.403 | 18.000 | 18.000 | 0,0% | *0* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 1.938 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **20.341** | **20.000** | **20.000** | **0,0%** | ***0*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **253.226** | **224.961** | **234.854** | **4,4%** | ***9.892*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 176 | 800 | 651 | -18,6% | *-149* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 5.700 | 4.482 | -21,4% | *-1.218* |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | -409 | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | | | -500 | | |
| | **Rentur íalt** | **585** | **6.500** | **5.633** | **-13,3%** | ***-867*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **252.640** | **218.461** | **229.221** | **4,9%** | **10.759** |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **1.234** | **1.234** | **1.234** | 0,0% | *0* |
| | **Avdráttir TH** | | **19.900** | **15.873** | -20,2% | *-4.027* |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **251.406** | **197.327** | **212.114** | **7,5%** | **14.786** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **209.704** | **190.574** | **192.899** | **1,2%** | **2.324** |

Búskaparráðið hevur nýliga lagt sína heystfrágreiðing fram, og metir Ráðið fyri 2023 ein búskaparvøkstur, tvs vøkstur í bruttotjóðarúrtøkuni BTÚ, upp á 2,6% í leypandi prísum.

Ráðið hevur samstundis saman við Hagstovuni endurskoðað vakstrartølini fyri ávikavist 2021, 2022 og 2023. Fyri 2022, sum Ráðið í fjør metti til 3,3%, er metingin nú 11,2%, sum er ein munandi hækking. Stóra hækkingin er merkt av stóra prísvøkstrinum, ið serliga man standast av krígnum í Ukraina. Ein vøkstur

roknaður út í leypandi prísum er ikki reinsaður fyri prísvøkstur. Mett verður, at prísvøksturin er 7,3%-stig av teim 11,2%'unum.

Hagstovuni vantar enn hetta amboðið - ein BTÚ-deflator - ið kann reinsa BTÚ fyri prísvøkstur, so at vøksturin eisini kann vísast í føstum prísum.

Ráðið sigur annars um føroyska búskapin, at tað framvegis er ferð á. Stóra virksemið hevur við sær lágt arbeiðsloysi og trot á arbeiðsmegi í bæði privat og almenna geiranum. Lønargjaldingarnar eru høgar, og tal av løntakarum higartil í 2022 setir met. Vøruhandilin við útheimin gevur framvegis avlop.

Hækkingin í brúkaraprístalinum fyri til dømis annan ársfjórðing í ár er tó tann hægsta í Føroyum seinastu 14 árini. Fyri at tálma prísvøkstrinum hava miðbankar kring heimin hækkað rentuna. Sum alt annað líka vil tálma nýtsluni hjá húsarhaldunum.

Enn sæst ikki nøkur munandi nýtsluminking her á landi, og flestu húsarhøld sigast av bankunum at vera væl fyri. Men handilsvinnan sigur frá einum minni eftirspurningi av húsbúnaði og marglætisvørum.

**INNTØKURNAR**
Hóast fyrst koronu og síðani kríggið í Ukraina kann sigast, at inntøkurnar hjá kommunni hava verið á einum jøvnum stigi.

Mett verður tó ráðiligt at hava eina varna meting av vøkstrinum í kommunuskatti millum annað við hækkingunum í vøruprísum og rentuni í huga. Av somu orsøk verður eisini felagsskatturin, skatturin frá partafeløgum, mettur varliga.

Inntøkumetingin av **kommunuskattinum** fyri 2023 er gjørd við støði í staðfestu inntøkunum fyrstu átta mánaðar í 2022 og fíggjarætlanartølini síðstu fýra mánaðarnar. Oman á samlaða metta talið fyri 2022 upp á 938 mió.kr eru løgd 2,00%. Inntøkurnar vaksa tá 4,0% ella 37,0 mió.kr upp í 957 mió.kr fyri 2023 í mun til 920 mió.kr, ið var metingin fyri 2022.

Inntøkurnar av **skatti av eftirlønarinngjøldum** fyri 2023 eru mettar til 185 mió.kr, sum er 15,6 mió.kr ella 9,2% hægri enn metta talið fyri 2022. Fyri 2021 var staðfesta talið 168 mió.kr.

Inntøkan frá **felagsskattuinum** er fyri 2023 mett at verða 30,0 mió.kr, sum er 5,0 mió.kr lægri enn metingin fyri 2022. Staðfesti felagsskatturin fyri 2021 bleiv annars 63,7 mió.kr, um enn metingin var munandi lægri. Men júst felagsskatturin kann vera torførur at meta um, tí botnlinjurnar hjá partafeløgunum eru til dømis nógv tengdar at vøruinnkeypsprísum og søluinntøkum.

**Samlaðu inntøkurnar** í fíggjarætlaninini fyri 2023 vaksa 46,6 mió.kr ella 4,0% upp í 1.208,7 mió.kr í mun til metingina fyri 2022 upp á 1.162 mió.kr.

**RAKSTRARÚTREIÐSLURNAR**
Virksemið í høvuðsstaðarkommununi er enn í stórum vøkstri.

Fólkatalið í Føroyum veksur støðugt. Størsti vøkstur í tali er í Tórshavnar kommunu. Nú búgva yvir 23.000 fólk í kommununi svarandi til 43% av samlaða fólkatalinum í landinum. Av teimum 23.000 eru 21.000 búsitandi í Tórshavn, Hoyvík og Argjum.

Talið av borgarum í kommununi vaks frá august 2021 til august 2022 við 1,7% ella 387 borgarum upp í 23.071 úr 22.684. Hetta er umleið sami vøkstur sum í fjør. Fólkatalið í øllum landinum vaks sama tíðarskeið 1,3%.

Seinastu 10 árini er talið av borgarum í Tórshavnar kommunu vaksið 3.309 ella 16,7%. Ein sovorðin vøkstur hevur við sær munandi øking í virksmeminum, tænastunum og harvið eisini rakstrarútreiðslunum.

Samanløgdu rakstrarútreiðslurnar hjá kommununi vaksa í fíggjarætlanini fyri 2023 netto 36,7 mió.kr upp í 953,8 mió.kr úr 917,1 mió.kr. Hetta er ein vøkstur upp á 4,0% í mun til fíggjarætlanina fyri 2022.

**Lønir eru størsti partur av rakstrarkostnaðunum**
Av samlaða bruttokostnaðinum eru lønirnar 60% og 75% av nettokostnaðunum. Til komandi ár eru lønirnar mettar at vaksa 29,7 mió.kr ella 4,7% í mun til fíggjarætlan fyri 2022. Í fjør vuksu lønirnar í fíggjarætlanini nakað meira: 32,3 mió.kr ella 4,94% í mun til fíggjarætlan 2021.

Av vøkstrinum fyri 2023 eru 16 mió.kr lønarhækkingar ísv sáttmalar. Harafturat er tað vøksturin í virksemi, ið økir um lønirnar við 13,7 mió.kr.

Sí talvuna niðanfyri.

| **Grein** *tús.kr* | **Lønar-hækking** | **Lønar-øking** | **Íalt** |
|---|---|---|---|
| § 1 Kommunal fyrisiting | 2.373 | 2.207 | 4.580 |
| § 2 Almanna- og heilsumál | 7.244 | 3.463 | 10.707 |
| § 3 Børn og ung | 3.529 | 2.057 | 5.586 |
| § 4 Undirvísing | 356 | 3.008 | 3.364 |
| § 5 Mentan og frítíð | 857 | 2.240 | 3.097 |
| § 6 Teknisk mál | 1.843 | 262 | 2.105 |
| § 6 Kommunal virkir TK | 909 | 410 | 1.319 |
| | **17.111** | **13.647** | **30.758** |

**Høvuðsútreiðslutøl á greinunum**

Á **§ 1 Kommunual fyrisiting** økjast nettoúreiðslurnar 4,6% ella 4,4 mió.kr. Størsti parturin av vøkstrinum er orsakað av sáttmálabundnum lønarhækkingum og virksemisbroytingum í samband við val og valnevndir. Tvey val verða komandi ár.

Nettoútreiðslurnar á **§ 2 Almanna- og heilsumál** økjast íalt við 4,1% ella 12,3 mió.kr, herav knappar 9 mió.kr er hækking í lønum, ið serliga stavar frá *eldraøkinum*.

*Kommunulæknatænastur* vaksa við 978 tkr, sum er ein hækking á 13,8%.

*Barnavernd* økist 1,05 mió.kr ella 15,6%. *Børn sett heiman í fosturfamliju* hækkar 1,7 mió.kr ella 8,9%. Av hesum er hækking í lønum 0,9 mió.kr. *Brúkaragjøld, serstovnar* lækkar 1,8 mió.kr, ið er ein hækking á 35%.

*Eldraøkið* stendur fyri størstu hækkingini í upphædd innan almanna- og heilsumál. *Konta 2720 Heilsuhúsið* hækkar 1,3 mió.kr svarandi til eina hækking á 3,6% orsakað av hægri prísum. *Konta 2721 Røktartænastur* hækkar 7,1 mió.kr svarandi til eina hækking á 4,5%, øll upphæddin er lønir. *Konta 2722 Tilboð* hækkar við 1,6 mió.kr, ið er ein hækking á 4,0%, alt lønir.

Nettoútreiðslurnar á **§ 3 Børn og ung** fylgja í høvuðsheitum barnatalinum og økjast 7,7 mió.kr ella 3,5%.

*Útreiðslurnar í teim fýra eindunum, B-A-R-N* økjast netto 4,6 mió.kr ella 2,8%. Barnatalið minkar við 15 í vøggustovunum, 55 í barnagørðunum og 112 fleiri børn í frítíðarskúlunum. Lagt er ikki upp fyri nýggjum útreiðslum til møguligt hægri barnatal. Fleiri forskúlatilboð verða eftir summarið 2023, og tí verður ein forskjóting ímillum grein 3 og 4 eins og ímillum barnagarðsbørn og frítíðarskúlabørn til forskúla.

Foreldragjaldið er óbroytt 27%.

*Útreiðslurnar til systkinaavsláttur* økjast 845 tkr ella 5,6% mett út frá útreiðslunum í 2022.

Nettoútreiðslurnar á **§ 4 Undirvísing** hækka 4,7 mió.kr ella 9,9%. Játtanin fylgir metta næmingatalinum. Nýggir forskúlar eru skipaðir frá sumrinum 2023 í Eysturskúlanum, Velbastaðar skúla, Kollafjarðar skúla og Kaldbaks skúla. Harumframt eru broytingar í lønum til skúlaleiðarar í hesum skúlum í samband við við forskúla. Játtan til reingerð er stillað hjá Skúlanum á Fløtum og Eysturskúlanum. Eisini eru stovningarútreiðslur í samband við nýggjar 8. flokkar í Santa Frans skúla. Játtanin til frítíðarskúla til forskúla hækkar, samstundis sum játtanin til barnagarðsstovur hækkar samsvarandi barnatalinum.

Nettoútreiðslurnar á **§ 5 Mentan og frítíð** hækka 1,7 mió.kr ella 2,7%. Størsta broytingin er hækkingin av játtanini til *kontu 5717 Ítróttaranlegg* á 10,5% ella 1,6 mió.kr, mestsum alt lønir. Játtanin til Kvøldskúlan hækkar 610 tkr ella 14,9% ísv økta undirvísing í føroyskum sum annað mál.

Nettoútreiðslurnar á **§ 6 Teknisk mál** økjast við 3,4% ella 5,0 mió.kr. *Konta 6110 Umsiting og røkt av bygningum, egið rakstrarstað* hækkar 1,5 mió.kr ella 4,6% orsakað av hækkaðum fermetrartali í ítróttarhallum. *Kontan 8114 Kavarudding* hækkar 1,7 mió.kr ella 51,8% í tráð við søguligan kostnað fyri hvønn frostdag og tal av frostdøgum.

Nettoútreiðslurnar á **§ 7 Kommunal virkir, frároknað Tórshavnar havn** økjast við 11,2% ella 8,6 mió.kr. *Konta 7110 Renovatión* veksur 21,3% ella 5,0 mió.kr. Talan er um eina resthækking vegna árligt gjald ísv tyrving á Nýggjheiðum í Kvívík. Eisini er mist inntøka á 600 tkr. *Konta 7510 Bussleiðin* hækkar 2,8 mió.kr samsvarandi nýggjum sáttmála og 2,5 mió.kr ov lítið búskettera í 2022.

-----

Í fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður úrslit áðrenn rentur 234,9 mió.kr.

Úrslit áðrenn avdráttir og íløgur verður 229,2 mió.kr.

Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá Tórshavnar kommunu verður 192,9 mió.kr.

Lániskuldin hjá kommununi er 242 mió.kr. Av hesum eru 233 mió.kr knýttar at Tórshavnar havn.

Er avlopið til skattafíggjaðar íløgur lægri enn samlaðu íløgurnar, má munurin fíggjast við meiri inntøku og/ella lægri útreiðslum og/ella lántøku.

Býráðið ásetir kommunuskattaprosentið og barnafrádráttin og kann umvegis hesi bæði broyta fortreytirnar fyri fíggjarætlanina.

## Skjøl

Yvirlit yvir sáttmálabundnar íløgur.

## Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

**Fíggjarnevndin 28. september 2022:** Framlagt.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Víst verður til fílreferansu: Yvirlit yvir ferðavinnupolitikk j.nr. 20/00089-61, 60 og 32.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. oktober 2022:** Framlagt.

**Heilsu- og eldranevndin 04. oktober 2022:** Framlagt.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2022:** Fíggjarætlanin og notat um fíggjarætlanina lagt fram. Vísandi til tað samtykkir nevndin at broyta mettu barnatølini fyri grein 3 og tillaga upphæddina samsvarandi.

**Trivnaðarnevndin 06. oktober 2022:** Fíggjarætlanin og notat um fíggjarætlanina lagt fram.

**Vinnunevndin 06. oktober 2022:** Framlagt.

**Havnanevndin 17. oktober 2022:** Fíggjarætlanin og notat um fíggjarætlanina lagt fram.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. oktober 2022:** Framlagt.

**Tekniska nevnd 17. oktober 2022:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Staðfestur felagsskattur í 2022 er 69,8 mió. kr. Felagsskatturin, sum fellur til gjaldingar í 2022, er álíknaður á teir roknskapir, har inntøkuárið fellur saman við ella endar í 2021. Í núverandi uppskoti til fíggjarætlan er felagsskatturin mettur til 30 mió.kr. Felagskatturin kann vera torførur at meta um, men sum gongdin er í búskapinum, verður mett ráðiligt at hækka partafelagsskattin til 60 mió.kr.

Fyri 2023 sigur nýggjasta metingin frá Fíggjarmálaráðnum av eftirlønarskattinum, at hesin verður 2 mió.kr hægri enn upprunaliga mett.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og fyrisitingarstjórin mæla til at hækka konto 20601 Felagskattur við 30 mió. kr. og at hækka konto 20801 Skattur av eftirlønargjøldum við 2 mió. kr. Samanlagt hækka inntøkurnar 32 mió. kr.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. oktober 2022 | Blað nr.: 963<br><br>Formansins merki: |

## 250/22 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 57/22 | 22/00009-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 51/22 | 22/00009-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 87/22 | 22/00009-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 74/22 | 22/00009-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 116/22 | 22/00009-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 101/22 | 22/00009-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 138/22 | 22/00009-1 |
| 8 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 131/22 | 22/00009-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 176/22 | 22/00009-1 |
| 10 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 167/22 | 22/00009-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 215/22 | 22/00009-1 |
| 12 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 192/22 | 22/00009-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 243/22 | 22/00009-1 |
| 14 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 217/22 | 22/00009-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 269/22 | 22/00009-1 |
| 16 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 250/22 | 22/00009-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni og juli verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

## 251/22 Møgulig standmynd/minnismerki um Andreu Árting

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 365/18 | 18/04076-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 247/19 | 18/04076-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 238/19 | 18/04076-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 203/19 | 18/04076-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 244/19 | 18/04076-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 58/20 | 18/04076-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 95/20 | 18/04076-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 74/20 | 18/04076-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 27.04.2020 | 125/20 | 18/04076-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 123/20 | 18/04076-1 |
| 11 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 96/20 | 18/04076-1 |
| 12 Býráðsfundur | 11.06.2020 | 119/20 | 18/04076-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 27/21 | 18/04076-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 31/21 | 18/04076-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 12.05.2021 | 116/21 | 18/04076-1 |
| 16 Mentamálanevndin | | | 18/04076-1 |
| 17 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 239/21 | 18/04076-1 |
| 18 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 251/22 | 18/04076-1 |
| 19 Mentamálanevndin | | | 18/04076-1 |
| 20 Fíggjarnevndin | | | 18/04076-1 |

**Upprunin til málið:**
Gunvør Balle, forkvinna í mentamálanevndini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ynski er at heiðra minni um Andreu Árting og hennara virki innan fakfelagsrørsluna, kappróður v.m. við at gera eina standmynd ella minnismerki/-varða.

Andrea Árting var komin væl upp í árini, tá hon í ringastu tíðunum í 30´unum púra óvæntað gjørdist forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag. Kreppan hevði við sær, at fakfeløgini vóru undir trýsti. Hetta nervaði tó ikki Andreu. Hon var órørd, og hon segði altíð tingini beint fram sama, hvar ið hon var. Við sínum eyðsýnda sosiala tilviti gjørdist hon ein ímynd fyri fakfelagsstríði í Føroyum í 20. øld. Alt sítt vaksna lív setti hon rættindini hjá kvinnum í brennidepilin. Hóast hon ongantíð sat á tingi, so virkaði hon í roynd og veru sum ein sosialpolitikkari. Lønin hjá arbeiðskvinnunum var størsta partin av 20. øld væl lægri enn hjá monnunum. Hetta setti Andrea sær fyri at broyta. Í 1977 rakk hon loksins úrslitinum, at kvinnur og menn skuldu fáa líka løn fyri sama arbeiði. Tá hon seinni sama árið legði frá sær sum forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag, var hon 85 ára gomul. Soleiðis verður sagt um Andreu Árting í sambandi við filmin, sum er gjørdur um hana og vístur í KVF í 2017.

Røddir hava av og á verið frammi um at gera eina standmynd av kendu havnarkonuni Andreu Árting.

Tórshavnar kommuna kundi tikið stig til samstarv við Havnar Arbeiðskvinnufelag og aðrar áhugapartar um at seta eina standmynd upp av Andreu Árting í býnum.

Ein staðseting kundi t.d. verði uttanfyri Steinatún, sum liggur mitt í býnum, har nógv fólk ferðast aftur og fram. Tað hevði klætt Tórshavnar kommunu væl at reist eina standmynd av hesi serstøku kvinnu, sum stríddist so íðuliga fyri rættindunum hjá kvinnum.

Møgulig staðseting av standmynd ella minnismerki/-varða er málsøkið hjá Býarskipanarnevndini og verður tikið upp í nevndini, um verkætlanin gerst aktuell.

Tá greitt er, hvørjir partar hava áhuga at vera við í verkætlanini, verður fíggjarætlan gjørd og leistur fyri, hvussu verkætlanin verður útint.

Eisini kann nevnast, at bók um søguna hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag eftir ætlan kemur út í 2019.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/læjttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um arbeiðast skal víðari við málinum og at fáa samstarv í lag við Havnar Arbeiðskvinnufelag og onnur um møguliga verkætlan.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í dialogi við nøkur fakfeløg um at vera við í hesi verkætlan, og ábendingar eru um, at tað helst ber til. Eisini hevur TK søkt Betri Stuðul um stuðul, men fekk noktandi svar. Fyri at skapa

betri grundarlag fyri at koma á mál við verkætlanini verður mett hóskandi, at TK nú tekur stig til at útvega hóskandi eginfígging til verkætlanina, sum so kann vera grundarlag undir endaligu tilgongdini at fáa onnur at koma við í samlaðu fíggingina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at:
1. Flyta 100 tkr. av konto 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting
2. Flyta 100 tkr. av projektkontu L57029 (sak: Gøtuítrótt) til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at heita á fíggjarnevndina at flyta 100 tkr. av kontu 5310 Mentanartiltøk o.a. til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av konto 4140, kr. 100.000 av L57029 og kr. 100.000 av konto 5310 á konto 5311 og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Til tess at gera verkætlanina ítøkiliga, verður mett neyðugt at fáa nærri viðgerð av møguligum staðsetingum og krøvum til sjálvt listaverkið Andreu Árting til heiðurs, hetta eisini sum liður at útvega samlaðu fíggingina. Á løgukontu 6275 Fríðkan av býnum, L62038 eru kr. 300.000 tøkar. Aftrat eru nakrar tilsagnir um fíggjarligan stuðul frá uttanhýsis pørtum komnar til verkætlanina.

Tørvur er á at fáa neyvari staðfest, hvørji krøv skulu setast til staðseting og listaverk. Tørvur er harumframt á uppskoti um tilgongd at útvega sjálvt verkið. Liður í hesum er eisini at meta um hóskandi vavi av samlaðu verkætlanini, harundir kostnað.

Tað eigur at verða heitt á Listaráðið um skjótast til ber at geva tilmæli til nevndarviðgerð hesum viðvíkjandi, so at tilgongd at útvega listaverk og aðrar fyrireikingar í sambandi við staðsetingina annars kunnu byrja.

Um tilgongdin at útvega listaverk v.m. krevur fígging, verður hetta at leggja aftur fyri nevnd at taka støðu til.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heita á Listaráðið um uppskot til staðseting av listaverkinum og krøv annars bæði til staðseting og listaverk. Mælt verður eisini til at heita á Listaráðið um uppskot til tilgongd at útvega listaverkið.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti**:
Tórshavnar listaráð hevur viðgjørt málið um staðseting av listaverkinum, umframt krøv til listaverkið og útveganartilgongd og hevur fylgjandi tilmæli.
---
*Viðv. staðseting*
*Listaráðið mælir til at verkið verður staðsett í Steintúni, treytað av at tað kann fáa hóskandi rúmd og pláss og ikki avmarkað til sjálvt torgið. Listafólkið skal kann arbeiða við staðseting í økinum.*

*Viðv. krøvum til listaverkið*
*Listaráðið mælir til at taka støði í nøkrum fáum krøvum, herundir boðskapinum um AÁ (kvinnujavnrættindi, sosialt rættvísti, áræði, áhaldni og sterk kvinnufyrimynd) og at verkið skal kennast fólksligt (ikki elitert), forvitnisligt og sjónligt í býarmyndini.*

*Viðv. útvegnar-/útboðstilgongd*
*Listaráðið mælir til at fara undir eina tilgongd har útvald yrkislistafólk fáa møguleika at luttaka í eini tilgongd, ið helst er í stigum. Einum undanumfari og so evt. eini millumstigi (tá móti ávísum gjaldi) og so endaligari tilgerð.*
---

Víðari tilgongd
Um samtykt verður at halda fram við verkætlanini fer Listabólkurin í kommununi, ið hevur ábyrgd av praktisku útveganini sbrt. galdandi reglugerð, undir útboðstilgongd at útvega listaverk. Hugsanin er at talan verður um innbodna tilgongd við einum undanumfari, og um valt verður at fara víðari til eitt annað umfar við fleiri luttakarum, at hesir tá fáa eina ávísa samsýning fyri kappingarluttøkuna.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Býarskipanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka støðu til um farast skal víðari við útboðstilgongdini við støði í tilmælinum frá Tórshavnar listaráði. Málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanarnevndini mæla til at taka undir við tilmælinum og at játta 100.000,- kr. av kt. 6275, fríðkan av býnum, L00001 løgukarmur fyri árið, til L62038 standmynd/minnismerki um Andreu Árting og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í framflytingunum frá fíggjarárinum 2019, ið kemur til viðgerðar í fíggjarnevndini og býráðnum í næstum, verða ætlandi framflytingar frá m.a. kontu 5210 Tórshavnar kvøldskúli, á umleið 950 tkr.

Mett verður at partur av hesum kann vera flutt til at betra um fíggjarliga grundarlagið fyri verkætlanini. Henda upphæddin er helst ikki nokk, men vil nú vera nøktandi grundarlag fyri at fara víðari við verkætlanini og byrja útveganartilgongdina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at flyta 250 tkr. av kontu 5210 Tórshavnar kvøldskúli til projektkontu L62038 – standmynd/minnismerki - Andrea Árting.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 11. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Listabólkurin hevur verið í tilgongd saman við Edvardi Fuglø, listamanni um skitsuuppskot til standmynd, og hevur eisini fingið gjørt uppskot, ið sýnir staðseting av standmyndini í sunnara parti av torginum í Steinatúni.

Á fundinum verður greitt nærri frá uppskotinum til standmynd og ætlaðu staðsetingini.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar. Málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina til kunningar.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur arbeitt við at finna eina endaliga staðseting av standmyndini í Steinatúni.

Mett verður, at standmyndin hevði tikið seg væl út í plantukummuni móti vestur, har hon í størstan mun verður staðsett, soleiðis at hon fær rúm og ikki verður kroyst upp ímóti natúrligu trøunum.

Sí viðheftu tekningar av ítøkiligu staðsetingini, j.nr. 18/04076-45, Staðseting_Standmynd av Andreu Árting.

Sigast skal, at hendan staðsetingin skal fínpussast, soleiðis at standmyndin fær nøktandi rúmd, og soleiðis at hon ikki verður fløkt inn í verandi planting og eitt nú lyktapelarnar í plantukummuni. Møguliga verður neyðugt at flyta onkra planting, og tað verður í framhaldandi tilgongdini neyðugt at taka støðu til hvussu standmyndin verður sett í plantukummuna, um gróður skal verða kring standmyndina ella um økið møguliga skal flísaáleggjast ella at eitthvørt annað skal gerast kring standmyndina. Øll hesi viðurskiftini eiga at verða tikin upp í komandi tilgongdini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at standmyndin av Andreu Árting verður staðsett í Steinatúni í vestastu plantukummuni, og at málið verður beint í mentamálanevndina til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Samtyktin hjá byggi- og býarskipanarnevndini tikin til eftirtektar.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Listabólkurin og Býarskipanardeildin hevur verið í samskifti við listamannin Edvard Fuglø um verkið og eru komin ásamt um nakrar tillagingar so verkið stendur seg enn betri í mun til umhvørvið í Steintúni.

Eisini er nú nærri greitt viðv. mettum kostnaði, og kemur umsitingin á greiða frá tí á fundinum. Neyðugt verður við eyka fígging afturat um verkætlanin skal fremjast.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 12. mai 2021:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Gunvør Balle biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

Leingi hevur verið arbeitt við at reisa eina standmynd av Andreu Árting, uml 1 mió kr er fingin til vega og byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt at standmyndin skal staðsetast í Steinatúni. Listafólkið er funnið og listaverkið er teknað og klárt er at fara til verka.

**Tilmæli:**
Gunvør Balle, Elsa Berg, Jákup Dam og Ruth Vang mæla til at fara undir arbeiðið at reisa standmyndina av Andreu Árting í Steinatúni og brúka tað uml. 1 mió kr ið hoyra til verkætlanina. Mælt verður samstundis til at seta 1 mió kr av á fíggjarætlanina fyri 2022 soleiðis at listaverkið er liðugt fíggjað.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Gunvør Balle biður um at fáa málið á skrá til býráðsfundin.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Málið umrøtt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 19:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Kristianna Winther Poulsen |
| Súna Mørk | Bjørg Dam | Elsa Berg |
| Jákup Dam | Gunvør Balle | Annika Olsen |
| Birgir Nielsen | Ruth Vang | Bergur Robert Dam Jensen |
| | Odd Færø | |